# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

**Umhvørvis- og vinnumálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 6. januar 2020. |
| Mál nr.: | 19/00632 |
| Málsviðgjørt: | HH |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarafyritøkum**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**um løggilding av elinnleggjarafyritøkum**

*Kapittul 1*

*Endamál*

**§ 1.** Endamálið við lógini er at tryggja, at elektriskar innleggingar verða rætt gjørdar og serviseraðar við atliti at trygd.

*Kapittul 2*

*Nýtsluøki*

**§ 2.** Bara elinnleggingarfyritøkur við løggilding eftir § 4, stk. 1, kunnu gera og servisera elektriskar innleggingar til sterkstreym og innleggingar av ikki-sterkstreymsriknum stýrings- og reguleringsskipanum, sum verða nýttar til at stýra sterkstreymsfunktiónum, sbr. tó stk. 3-6.

*Stk. 2.* Arbeiðir, sum eru fevnd av kravinum um løggilding, verða roknað frá og við fastari íbinding í ella úrbinding úr elveitingarútbúnaði og fevna um fastar kaðalskipanir, talvur, málarar, íbindingarstøð og annað fast innleggingartilfar umframt fasta íbinding og úrbinding av elektriskum maskinum og brúkslutum.

*Stk. 3.* Fyritøkur, sum vinnuliga framleiða ella servisera stýrings- og reguleringsskipanir, sum verða nýttar til at stýra sterkstreymsfunktiónum, kunnu hóast stk. 1 leggja inn og servisera ikki-

sterkstreymsriknar stýrings- og reguleringsskipanir.
*Stk. 4.* Fyritøkur, sum vinnuliga framleiða ella servisera elektriskar maskinur og nýtslulutir, kunnu hóast stk. 1 gera fastar íbindingar og úrbindingar av elektriskum maskinum og nýtslulutum og servisera hesi.
*Stk. 5.* Talvuframleiðarar kunnu hóast stk. 1 í ávísan mun servisera innleggingartalvur. Tað fevnir um at umvæla, viðlíkahalda, hava eftirlit við, tillaga og kanna elinnleggingar, men ikki um at broyta og skifta út innleggingartalvur.
*Stk. 6.* Løgtingslógin fevnir ikki um elektriskar innleggingar umborð á skipum og flogførum og í akførum. Tó fevnir løgtingslógin um elektriskar innleggingar umborð á húsbátum og í húsvognum og búvognum.

**§ 3.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um undantøk frá løggildingarkravinum fyri

1) framleiðarar, tá ið teir gera fastar elektriskar innleggingar í ídnaðarliga framleiddum flytførum eindum,
2) framleiðarar, tá ið teir í sambandi við gerð av bygningslutum fyrireika elektriskar innleggingar, og
3) gerð av einføldum arbeiðum.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann harumframt áseta reglur um innlegging og servisering av ikki-konventionellum elframleiðandi útbúnaði og um undantøk frá løggildingarkravinum fyri slíkan útbúnað.

*Kapittul 3*

*Løggilding og góðkenning*

*Løggilding*

**§ 4.** Elnevndin gevur elinnleggjarafyritøkum, sum søkja um tað, løggilding, sbr. § 2, tá ið tær hava skjalprógvað, at

1) tað í fyritøkuni eru ein ella fleiri fakligir ábyrgdarar, sum eru góðkendir sambært § 7, stk. 1, og knýttir at fyritøkuni sum starvssettir, sum einaeigarar av einstaklingsfyritøku ella sum luttakarar í íognarfelag ella kommandittfelag,
2) fyritøkan hevur eina góðkenda góðskuleiðsluskipan, sbr. § 13,
3) fyritøkan ikki er undir trotabúsviðgerð ella avtøku,
4) gjald er rindað, sbr. § 11, og
5) fyritøkan hevur fastan vinnustað við telefon í Føroyum.

*Stk. 2.* Við føstum vinnustaði, sbr. stk. 1, nr. 5, meinast, at fyritøkan í royndum útinnir vinnuvirksemi í Føroyum viðvíkjandi gerð og servisering av løggildingarfevndum arbeiði í eitt ikki nærri tilskilað tíðarskeið og við fastari skrivstovu, haðan virksemið viðvíkjandi avtalum o.ø. viðvíkjandi arbeiðinum í royndum verður framt.
*Stk. 3.* Tann, sum eigur fyritøkuna, ella, tá ið fyritøkan verður rikin í felagsformi, tann fyrisitingarligi stjórin skal geva skrivliga váttan fyri, hvørt fyritøkan ella viðkomandi sjálvur innan fyri tey seinastu trý árini er revsaður fyri brot á hesa løgtingslógina, ta áður galdandi løgtingslógina um løggilding av elinnleggjarum v.m., ta áður galdandi løgtingslógina um sterkstreymsútbúnað, løgtingslóg um elelektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (eltrygdarlógina) ella reglur ásettar við heimild í hesum løgtingslógunum.
*Stk. 4.* Elnevndin førir løggildingarskrá og førir fyritøkur, sum eru løggildar sambært stk. 1, í skránna. Skráin er alment atkomandi á heimasíðuni hjá Elnevndini.

*Útinning av virkseminum*

**§ 5.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um

1) útinning av løggildum virksemi,
2) tilknýtið hjá tí fakliga ábyrgdaranum til fyritøkuna og

3) útinning av løggildum virksemi í Føroyum uttan fastan vinnustað í Føroyum.

**§ 6.** Fyritøkan skal tryggja, at tann fakligi ábyrgdarin, sbr. § 8, stk. 1, nr. 1, hevur tær neyðugu heimildirnar at kunna røkja sínar uppgávur.
*Stk 2.* Er tann fakligi ábyrgdarin knýttur at fyritøkuni sum starvssettur, skal hann vera settur við í minsta lagi tríggja mánaða uppsagnarfreist eftir seks mánaða starvssetan.

*Góðkenning sum fakligur ábyrgdari*

**§ 7.** Elnevndin gevur góðkenning sum fakligur ábyrgdari, tá ið tað er skjalprógvað, at
1) umsøkjarin hevur staðið eina góðkenda førleikagevandi roynd. og lýkur tey starvskrøv, sum landsstýrismaðurin hevur ásett, sbr. § 8, nr. 2.
2) umsøkjarin hevur havt í minsta lagi 1 árs tøkniligt starv í sterkstreymstøkniligum virki, um so er, at 5 ár ella meira eru gingin frá tí degi, hesin stóð royndina.
3) umsøkjarin er myndigur og ikki eru undir verjumáli eftir § 7 í verjumálslógini, og
4) tað er rindað gjald, sbr. § 11.

*Stk. 2.* Umsøkjarin skal geva skrivliga váttan fyri, um fyritøkan ella viðkomandi sjálvur innan fyri tey seinastu trý árini er revsaður fyri brot á hesa løgtingslógina, ta áður galdandi løgtingslógina um løggilding av elinnelggjarum v.m., ta áður galdandi løgtingslógina um sterkstreymsútbúnað, eltrygdarlógina ella reglur ásettar við heimild í hesum løgtingslógunum.

**§ 8.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um
1) uppgávurnar hjá fakligum ábyrgdarum í løggildum fyritøkum,
2) førleikagevandi royndir og starvskrøv, sum geva atgongd at søkja um góðkenning sum fakligur ábyrgdari, og
3) útinning av vinnu sum fakligur ábyrgdari við støði í útlendskum vinnuførleikum, m.a. um forboð fyri fyribils ella tilfallandi útinning av vinnu sum fakligur ábyrgdari, sbr. § 5, stk. 1, nr. 1, fyri persónar, sum ikki lúka førkeikakrøvini.

*Noktan*

**§ 9.** Uttan mun til um treytirnar í §§ 4 og 5 fyri at fáa løggilding ella góðkenning sum fakligur ábyrgdari eru loknar, kann Elnevndin nokta at geva góðkenning
1) um umsøkjarin uttanlands er komin undir revsitiltøk fyri viðurskiftir, sum kunnu javnmetast við tey í § 78, stk. 2, í revsilógini nevndu, ella
2) um umsøkjarin í starvi ella vinnu annars hevur sýnt slíkan atburð, at orsøk er at halda, at fyritøkan ikki fer at verða rikin á fullgóðan hátt.

*Stk. 2.* Í sambandi við noktan eftir stk. 1, nr. 1, verður § 78, stk. 3, í revsilógini nýtt samsvarandi.

*Undantak*

**§ 10.** Elnevndin kann í serligum førum gera undantak frá treytunum í § 4, stk. 1, nr. 1- 3, og nr. 5, § 5, stk. 1, og § 8, stk. 1, nr. 1 og 2.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um atgongdina at gera undantak frá kravinum í § 4, stk. 1, nr. 1.

*Gjald*

**§ 11.** Elnevndin krevur eitt gjald í sambandi við umsóknir um løggilding og góðkenning sum fakligur ábyrgdari umframt eitt árligt gjald fyri at varðveita løggildingina ella góðkenningina.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur um støddina á gjøldunum eftir stk. 1, og hvussu tey verða kravd inn.

*Kapittul 4*

*Upplýsingarskylda*

**§ 12.** Ein løggild fyritøka, sbr. §§ 4 og 5, skal beinanvegin boða Elnevndini frá, tá ið ein fakligur ábyrgdari verður knýttur at fyritøkuni. Fyritøkan skal somuleiðis beinanvegin boða Elnevndini frá, tá ið tann fakligi ábyrgdarin fer úr starvi ella ikki verður til staðar í meira enn seks fylgjandi vikur.
*Stk. 2.* Ein løggild fyritøka, sbr. §§ 4 og 5, skal boða Elnevndini frá broytingum í upplýsingunum, sum eru fráboðaðar Elnevndini í sambandi við løggildingina.

*Kapittul 5*

*Góðskuleiðsluskipan*

**§ 13.** Ein fyritøka, sum søkir um løggilding eftir §§ 4 og 5, skal leggja fram skjalprógv fyri, at fyritøkan hevur eina góðkenda góðskuleiðsluskipan. Góðskuleiðsluskipanin skal venda sær móti tí partinum av tí handilsliga grundarlagnum hjá fyritøkuni, sum viðvíkur tí løggildingarfevnda arbeiðinum. Elnevndin ella ein av Elnevndini góðkendur eftiransingarstovnur skal góðkenna og javnan eftirkanna góðskuleiðsluskipanina, sbr. tó stk. 5
*Stk. 2.* Fyritøkan ber kostnaðin, í sambandi við at góðskuleiðsluskipanin hjá fyritøkuni verður góðkend og eftirkannað.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um

1) innihaldið í tí í stk. 1 nevndu góðskuleiðsluskipanini,
2) undantak frá kravinum um eftirkanning av góðskuleiðsluskipanini fyri fyritøkur, sum ikki hava fastan vinnustað í Føroyum, og sum gera arbeiði sum fyribils tænastuveitingar í Føroyum,
3) eykaeftirkanning av góðskuleiðsluskipanini í førum, har fyritøkan hevur verið órøkin í sambandi við útinning av innleggingararbeiði, og
4) góðkenning av eftiransingarstovnum til at røkja uppgávur eftir stk. 1 og eftirkanning av góðkendum eftiransingarstovnum, sum ikki hava fastan vinnustað í Føroyum.

*Stk. 4.* Ein fyritøka, sum ikki hevur fastan vinnustað í Føroyum skal skjalprógva, at hon hevur eina góðskuleiðsluskipan, sum viðvíkur arbeiðum, sum fyritøkan ger í Føroyum, og sum kann verða góðkend eftir reglum ásettum eftir stk. 3, nr. 1, ella aðra skipan, sum kann javnmetast við eina slíka skipan.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um akkreditering av eftiransingarstovnunum, m.a. at tann einstaki eftiransingarstovnurin ber útreiðslurnar í sambandi við akkreditering og eftirkanning av sínum førleikum og síni góðskuleiðsluskipan. Eitt krav um akkreditering kemur í staðin fyri eftirkanningina hjá Elnevndini av eftiransingarstovnunum.

*Kapittul 6*

*Burturfall og afturtøka*

*Burturfall*

**§ 14.** Ein løggilding, sum er givin sambært §§ 4 og 5, fellur burtur, tá ið fyritøkan kemur undir trotabúsviðgerð, fer í avtøku ella heldur uppat, ella eingin fakligur ábyrgdari longur er knýttur at fyritøkuni, sbr. § 4, stk. 1, nr. 1, ella tann fakligi ábyrgdarin ikki er til staðar í meira enn seks fylgjandi vikur.

**§ 15.** Ein góðkenning sum fakligur ábyrgdari fellur burtur, tá ið tann góðkendi ikki longur lýkur treytirnar í § 7, stk. 1, nr. 2.

*Afturtøka*

**§ 16.** Elnevndin kann taka løggilding, sum er givin sambært §§ 4 og 5, aftur,

1) tá ið fyritøkan grovliga ella ofta hevur verið órøkin í sambandi við útinning av innleggingararbeiði,
2) tá ið eftiransingarstovnurin ikki kann góðkenna góðskuleiðsluskipanina endaliga ella tað leypandi eftirlitið við góðskuleiðsluskipanini ella eykaeftirkanningin eftir §14, stk. 3, nr. 3, avdúkar grefligar feilir við innaneftirlitinum,ella
3) tá ið treytirnar fyri løggildingini ikki longur eru loknar.

*Stk. 2.* Fyritøkan, sum ein avgerð um afturtøku eftir stk. 1 viðvíkur, kann krevja, at avgerðin verður løgd fyri dómstólarnar. Ein áheitan um at leggja málið fyri dómstólarnar skal leggjast fyri Elnevndina, í seinasta lagi fýra vikur eftir at avgerðin er fráboðað fyritøkuni.
*Stk. 3.* Elnevndin stevnir uttan óneyðugan steðg tí í stk. 2 nevndu fyritøkuni samsvarandi mannagongdini í borgarligum rættargangi.
*Stk. 4.* Ein áheitan um at reisa sakarmál viðvíkjandi afturtøku eftir stk. 1 hevur steðgandi virknað. Rætturin kann tó við úrskurði gera av, at fyritøkan ikki skal útinna virksemi sum løggild, meðan málið verður viðgjørt.

*Kapittul*

*Boð*

**§ 17.** Hevur ein fyritøka, sum ger elektrisk arbeiðir sambært § 2, stk. 3 og 4, ella sambært reglum ásettum sambært § 3, stk. 1, nr. 1 og 2, ella stk. 2, grefliga ella ofta framt brot á krøv í reglum sambært áður galdandi løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað, krøv í reglum sambært galdandi eltrygdarlóg ella onnur trygdarkrøv, kann Elnevndin geva fyritøkuni boð um at lata eina løggilda fyritøku gera slík arbeiðir.
*Stk. 2.* Broytast fyritreytirnar fyri boðunum eftir stk. 1, kann fyritøkan heita á Elnevndina um at meta um, um boðini framvegis skulu standa við.
*Stk. 3.* Ein fyritøka, sum hevur fingið boð eftir stk. 1, kann krevja, at avgerðin verður løgd fyri dómstólarnar. Ein áheitan um at leggja málið fyri dómstólarnar skal leggjast fyri Elnevndina, í seinasta lagi fýra vikur eftir at avgerðin er fráboðað fyritøkuni.
*Stk. 4.* Elnevndin stevnir uttan óneyðugan steðg tí í stk. 2 nevndu fyritøkuni samsvarandi mannagongdini borgarligum rættargangi.
*Stk. 5.* Ein áheitan um at reisa sakarmál eftir stk. 3 hevur steðgandi virknað. Rætturin kann tó við úrskurði gera av, at sakarmálið ikki skal hava steðgandi virknað.

*Kapittul 8*

*Lýsingar o.a.*

**§ 18.** Hevur ein fyritøka onga góðkenning eftir § 4 ella § 5, ella er løggildingin hjá fyritøkuni burturfallin ella afturtikin, skal fyritøkan ikki við lýsingum ella á annan hátt gera nakað, sum kann geva eina fatan av, at fyritøkan hevur løggilding.

*Kapittul 9*

*Eftirlit*

**§ 19.** Elnevndin hevur eftirlit við, at henda løgtingslógin og reglur ásettar sambært hesi løgtingslógini verða hildnar.
*Stk. 2.* Elnevndin kann krevja at fáa allar upplýsingar, sum henni tørvar til at røkja eftirlitið eftir stk. 1.
*Stk. 3.* Elnevndin kann somuleiðis krevja at fáa upplýsingar, sum henni tørvar til at meta um, um treytirnar fyri eini løggilding framvegis eru loknar.

**§ 20.** Er illgruni um váða fyri vandamiklum elektriskum innleggingum, skal Elnevndin við samleikaváttan og uttan

rættarúrskurð hava atgongd at almennum og privatum ognum og plássum. Verður mett, at tað krevst til at fremja munadygt eftirlit við fyritøkum, sum eru fevndar av hesi løgtingslógini, skal Elnevndin somuleiðis við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð hava atgongd at ognum og plássum, haðan fyritøkurnar verða riknar. Verður mett, at tað krevst til at fremja munadygt eftirlit við fyritøkum, sum er fevndar av hesi løgtingslógini, hevur Elnevndin harumframt við samtykki frá borgara ella fyritøku, sum verða ávirkað, atgongd at øðrum almennum og privatum ognum og plássum.
*Stk. 2.* Eftirlitsmyndugleikin kann heita á løgregluna um at vera sær til hjálpar, tá ið heimildirnar eftir stk. 1 verða útintar.

**§ 21.** Í sambandi við fráboðanir, sum eru kravdar sambært eltrygdarlógini ella reglum ásettar sambært eltrygdarlógini, skulu netfeløg kanna eftir, um arbeiðið er gjørt av fyritøkum, sum eftir reglunum í hesi løgtingslógini ella reglum ásettum sambært hesi løgtingslógini hava heimild at gera tað.

**§ 22.** Ein netfyritøka skal boða Elnevndini frá, um staðfest verður, at brot er framt á reglur í hesi løgtingslógini ella reglur ásettar sambært hesi løgtingslógini, at órøkjuskapur er framdur í sambandi við útinning av arbeiðinum, ella at tann løggilda fyritøkan hevur virkað á ein hátt, sum kann hava við sær, at løggildingin verður tikin aftur sambært § 16, stk. 1.

*Kapittul 10*

*Fyrisiting*

**§ 23.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um mannagongdina í sambandi við umsókn um løggilding og góðkenning sum fakligur ábyrgdari sambært hesi løgtingslógini.

**§ 24.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at fyriskipanir sambært hesi løgtingslógini, sum seta fyritøkum o.ø. krøv, og tekniskar spesifikatiónir, sum víst verður til í slíkum fyriskipanum, ikki verða tiknar upp í Kunngerðablaðið.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur um, hvussu upplýsingar kunnu fáast um innihaldið í fyriskipanunum og teimum teknisku spesifikatiónum, sbr. stk. 1.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at tekniskar spesifikatiónir, sum ikki verða tiknar upp í Kunngerðablaðið, sbr. stk. 1, skulu vera galdandi, hóast tær ikki eru á føroyskum.

*Kapittul 11*

*Kæra*

**§ 25.** Avgerðir, sum Elnevndin hevur tikið eftir hesi løgtingslógini ella reglum ásettum sambært hesi løgtingslógini, kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.
*Stk. 2.* Noktandi svar upp á umsókn um løggilding og góðkenning sum fakligur ábyrgdari, sum er grundað á umstøður, sum eru nevndar í § 9, stk. 1, nr. 2, kann tó leggjast fyri Vinnukærunevndina, í seinasta lagi fýra vikur eftir at boðað er frá svarinum.

*Kapittul 12*

*Revsiásetingar*

**§ 26.** Við bót verður revsaður tann, sum

1) uttan at vera heimilaður til tað ger arbeiði, sum krevur løggilding eftir § 2,
2) tilætlað ella av grovum ósketni letur eina fyritøku ella ein persón, sum ikki eftir hesi løgtingslógini hevur heimild til tað, gera arbeiði, sum krevur løggilding eftir § 2,
3) fremur brot á 6, stk. 1,
4) letur vera við at boða frá eftir § 12, stk. 1, 1. pkt.,
5) fremur brot á boð eftir § 17, stk. 1,
6) fremur brot á § 18, ella

7) setur upplýsingarskylduna eftir § 19, stk. 2, til viks.

*Stk. 2.* Í reglum ásettum sambært §§ 3, 6 og 9 kann verða ásett, at brot á reglurnar verða revsað við bót.

*Stk. 3.* Tá ið revsing verður ásett, skal dentur serliga leggjast á, um brotið hevur elvt til váða fyri trygdina, og um brotið er framt sum liður í einum skipaðum broti á reglurnar.

**§ 27.** Revsiábyrgd kann verða áløgd feløgum o.ø. eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

*Kapittul 13*

*Gildiskoma og skiftisásetingar*

*Gildiskoma*

**§ 28.** Lógin kemur í gildi tann 1. januar 2021.

*Stk. 2.* Løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum v.m. verður sett úr gildi.

*Skiftisásetingar*

**§ 29.** Persónligar løggildingar, sum eru givnar, áðrenn henda løgtingslógin kemur í gildi, verða verandi í gildi, til tær møguliga verða skiftar um við eina góðkenning sum fakligur ábyrgdari ella falla burtur.

*Stk. 2.* § 15 í hesi løgtingslógini verður nýtt samsvarandi í sambandi við tær í stk. 1 nevndu løggildingarnar.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið skal koma í staðin fyri galdandi løggildingarlóg, t.e. løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 um løggilding av elinnleggjarum v. m.

Galdandi løggildingarlóg er frá 1993, og tað eru bara gjørdar tvær smávegis broytingar í lógini, síðan hon kom í gildi. Hetta í sjálvum sær ger, at tørvur er á at endurskoða lógina.

Atgongdin til at gera arbeiði upp á elektriskar innleggingar hevur verið lóggarregulerað, stórt sæð síðan elektrisitetið varð sett í verk í Føroyum. Verandi skipan varð grundað við løgtingslóg nr. 29 frá 26. november 1953 um tekniskar innleggingar, sum staðfestir, at bara persónar, sum hava staðið eina góðkenda roynd, kunnu gera arbeiði, sum er fevnt av lógini.

Við lógaruppskotinum verður ein nýggj løggildingarskipan sett í verk.

Uppskotið leggur upp til eina fyritøkuløggilding við einføldum innaneftirlitskrøvum, har tað bara verða sett krøv, sum hava týdning fyri trygdina, og sum eisini hóska til smáar fyritøkur. Tað verður upp til fyritøkurnar sjálvar, hvussu tær handfara viðurskiftir, sum ikki beinleiðis eru viðkomandi fyri trygdina við innleggingunum.

Verandi trygdarstig verður varðveitt, við tað at løggildingarskipanin er grundað á trý grundleggjandi krøv til fyritøkurnar um rættar førleikar, innaneftirlit og eftirlit frá triðjaparti. Samstundis verður lagt upp til herdar sanktiónir fyri skipað brot á reglurnar og brot, sum hava við sær vanda fyri trygdina.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sterkstreymslóggávan varð dagførd í 1993. Lógaruppskotið, løgtingsmál 132/1992, bygdi á álitið *Uppskot til sterkstreymslóggávu v.m. fyri Føroyar* frá 1993 (eftir hetta *álitið*) og uppskot til lóggávu frá táverandi Elnevndini.

Uppskotið til nýggja lóggávu var í tveimum og fevndi um uppskot til løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað og uppskot til løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum. Uppskotini vórðu samtykt í Løgtinginum uttan broytingar.

*Lógarøkið og kravið um løggilding*

Verandi løggildingarlóg er galdandi fyri alt arbeiði upp á fastar brúkarainnleggingar við teimum føstu íbindingunum av elektriskum maskinum, nýtslulutum og hjálpartólum umframt upp á innlegging, broyting og umvæling av ikki-sterkstreymsriknum stýrings- og reguleringsskipanum, sum verða nýttar til at stýra sterkstreymsútbúnaði.

Sambært løggildingarlógini krevst løggilding sum elinnleggjari fyri at gera arbeiði upp á fastar elektriskar innleggingar, t.e. elektriskar innleggingar í bústøðum, ídnaðarvirkjum, skrivstovum o.t. Kravið um løggilding er grundað á atlit at trygdini, bæði fyri persónarnar, sum gera arbeiði upp á sterkstreymsinleggingar og fyri persónarnar, sum nýta sterkstreymsinnleggingar.

Umvælingar og tillagingar av íbundnum maskinum við tilhoyrandi stýringsútbúnaði kunnu hinvegin verða gjørdar av fyritøkum, sum eru serkønar á økinum.

Harumframt kann ein og hvør við neyðugum kunnleika til at gera arbeiðið skifta út normaltættar avbrótarar og stikkkontaktir uttan jørð upp til í mesta lagi 250 V og seta upp og taka niður ljósútbúnað í íbúðum, um tað ikki verður gjørt við vinnuligum endamáli.

*Útbúgvingarkrøv*

Er ein sterkstreymsminnlegging ikki gjørd rætt, er stórur vandi fyri, at hon kann skaða persónar og ognir orsakað av váðanum fyri stoyti ella eldsbruna. Fyri at fyribyrgja hesum váðanum er neyðugt, at persónarnir, sum gera arbeiðið, hava ta neyðugu útbúgvingina. Ein partur av hesi útbúgvingini er undirvísing í tí umfatandi tekniska regluverkinum fyri gerð av sterkstreymsinnleggingum, sum við heimild í løggildingingarlógini er sett í gildi í eini sterkstreymsreglugerð. Í praksis kunnu persónar, sum ikki hava fingið hóskandi eltekniska útbúgving, ikki skilja og nýta hesar torgreiddu teknisku ásetingarnar á trygdarliga fullgóðan hátt.

*Tilknýti til fyritøkuna*

Løggildingin er persónlig, men hon er knýtt at fyritøkuni, har løggildingin skal verða nýtt.

Galdandi reglur um tilknýti hjá løggildum persóni til fyritøkuna eru ásettar í kunngerð nr. 174 frá 21. september 1993 um løggilding av elinnleggjarum

Løggilding kann annaðhvørt verða latin persóni, sum sjálvur ætlar sær at reka innleggingarvirksemi, ella persóni, sum er settur í starv hjá virki ella felag, sum rekur innleggingarvirksemi. Tann løggildi skal starvast fulla tíð í virkinum.

Verður løggildingin latin einum starvsfólki, skal starvsfólkið vera sett sum stjóri ella við starvsmannatreytum sambært løgtingslóg um starvsmenn og hava rætt til at taka avgerðir viðvíkjandi arbeiðinum, ið lógin fevnir um. Hetta skal verða prógvað við at senda inn sáttmálar o.a. í sambandi við umsóknina.

Bakstøðið fyri kravinum er, at tann persónliga løggildingin eisini í royndum er til staðar í fyritøkuni á ein hátt, sum ger tað møguligt at átaka sær ábyrgdina av tí løggildingarfevnda arbeiðinum, undir hesum at geva starvsfólkum boð, í sambandi við at arbeiðið verður gjørt, og hava eftirlit við arbeiðinum.

Eftir galdandi skipan krevst bara persónlig løggilding. Tað merkir t.d., at tað altíð er tann løggildi innleggjarin, sum hevur ábyrgdina av brotum á tær teknisku ásetingarnar í sterkstreymsreglugerðini, eisini í teimum førum, har fyritøkan ikki hevur givið elinnleggjaranum møguleika at lúka sína ábyrgd.

Hendan skipanin virkar ikki so væl í teimum førum, har tann løggildi elinnleggjarin ikki samstundis eigur fyritøkuna, men er starvsettur í fyritøkuni, og tí er tørvur á, at skipanin verður broytt.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Nútíðargerðin av løggildingarskipanini skal styrkja smidleikan, kappingina og framleidnið til gagns fyri bæði fyritøkurnar og brúkararnar, uttan at slakað verður viðvíkjandi trygdini.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

**1.4.1. Lógarøkið**

Lógarøkið er í høvuðsheitum tað sama sum eftir galdandi lóg, men umorðað, m.a. soleiðis at lagt er upp fyri nýggjum arbeiðsøkjum, sum kunnu koma.

Samstundis verður skotið upp ávísar avmarkingar í teimum arbeiðum, sum krevja løggilding. Eftir uppskotinum kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um undantøk frá løggildingarkravinum.

Undantøk kunnu ásetast fyri framleiðarar, tá ið teir gera fastar elektriskar innleggingar í ídnaðarliga framleiddum flytførum eindum, t.d. kampingvognar og skúrvognar.

Undantøk kunnu eisini ásetast fyri framleiðarar, tá ið teir í sambandi við gerð av bygningslutum fyrireika elektriskar innleggingar, t.d. og rør og dósir, sum verða stoypt inn í preframleiddar bygngingslutir.

Einføld arbeiðir kunnu eftir uppskotinum eisini verða undatkin løggildingarkravinum, t.d. at skifta út avbrótarar og stikkontaktir undir nærri avmarkaðum, umstøðum umframt at seta upp og taka niður lampur undir nærri avmarkaðum umstøðum. Eftir galdandi reglum kann ein og hvør, ið hevur neyðugan kunnleika til at gera arbeiðið, skifta út normaltættir avbrótarar og stikkkontaktir uttan jørð upp til í mesta lagi 250V og seta upp og taka niður ljósarmaturir í íbúðum, um so er, at hetta ikki verður gjørt við vinnuligum endamáli. Ætlanin er, at tað í kunngerð verður ásett, at ein og hvør við tí neyðuga kunnleikanum skal kunna skifta út avbrótarar og stikkkontaktir uttan jarðsamband upp í í mesta lagi 250 V, um hylkiskravið ikki fer upp um IP20. Stikkkontaktir við jarðsambandi kann ein og hvør við tí neyðuga kunnleikanum til at gera arbeiðið skifta, um hylkisskravið ikki fer upp um IP20, um innleggingin er vard við RCD - avbrótara.

Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um innlegging og servisering av ikki konvensjonellum elframleiðandi útbúnaði og reglur um undantøk frá løggildingarkravinum fyri hesar útbúnaðir, t.d. húsvindmillur ella sólselluútbúnaður

**1.4.2. Løggildingarskipanin**

Skotið verður upp, at galdandi løggildingarskipan verður broytt til eina skipan, sum setur í verk eina fyritøkuløggilding. Ein fortreyt fyri at fáa eina fyritøkuløggilding er, at tað í fyritøkuni eru ein ella fleiri fakligir ábyrgdarar, sum eru góðkendir sum fakliggir ábyrgdarar, og sum eru knýttir at fyritøkuni sum starvssettir, sum einaeigarar av einstaklingsfyritøku ella sum luttakarar í íognarfelag ella kommandittfelag. Harumframt skal fyritøkan hava góðskuleiðsluskipan, sum er serliga ætlað til eltrygd, t.e. ætlað at tryggja, at arbeiðið verður gjørt rætt við atliti at eltrygd. .

Skipanin verður grundað á trý grundleggjandi krøv til fyritøkurnar

1) um rættar førleikar við at seta ein fakligan ábyrgdara,
2) innaneftirlit og

3) eftirlit frá triðjaparti, sum góðkennir og eftirkannar góðskuleiðsluskipanina hjá fyritøkuni.

Skipanin, sum skotin verður upp, er sostatt ein fyritøkuløggildingarskipan, har fyritøkan hevur ta fullu ábyrgdina av arbeiðinum.

Tað merkir, at tann persónliga løggildingin ikki heldur fram.

**1.4.3. Tann fakligi ábyrgdarin**
Eftir galdandi reglum skal ein umsøkjari fyri at fáa løggilding lúka nøkur útbúgvingarkrøv umframt krøv til starvsroyndir. Hesi krøvini eru ásett í kunngerð nr. 175 frá 21. september 1993 um góðkendar royndir og starvskrøv fyri løggilding av elinnleggjarum.

Skotið verður upp, at tað verður ein treyt fyri at verða góðkendur sum fakligur ábyrgdari, at umsøkjarin hevur staðið eina førleikagevandi roynd, sum Elnevndin hevur góðkent og avís starvskrøv. Tað svarar til kravið, sum í dag verður sett fyri at fáa persónliga løggilding.

Góðkenningin sum fakligur ábyrgdari tryggjar, at tann, sum søkir um starv, lýkur lógarkravið, t.e., at teir fakligu førleikarnir hjá viðkomandi eru skjalprógvaðir við eini roynd, sum er staðin, starvskrøv, og viðkomandi er myndigur, ikki undir lágverjumáli og ikki revsaður fyri grovt brot á løggildingarlóggávuna tey seinastu trý árini.

**1.4.4. Tilknýtið hjá tí fakliga ábyrgdaranum til fyritøkuna**
Eftir lógaruppskotinum skal tann fakligi ábyrgdarin við sínum fakligu førleikum framvegis vera ein partur av grundarlagnum undir tí teknisku trygdini viðvíkjandi gjørdum arbeiðum. Viðkomandi skal tí vera til staðar í fyritøkuni fyri at tryggja, at uppgávurnar verða rætt mannaðar, at starvsfólk fáa hóskandi vegleiðing, og at neyðugt eftirlit verður framt.

Samstundis skal fyritøkan útvega tí fakliga ábyrgdaranum heimildir, sum gera viðkomandi føran fyri at røkja sínar uppgávur. Kravið um, at tann fakligi ábyrgdarin skal vera til staðar í ávíst tímatal (30) um vikuna, heldur fram, og honum verða tryggjaðar neyðugar heimildir í fyritøkuni, umframt at uppsagnarávaring verður ásett fyri viðkomandi.

Eins og í dag verður uppgávan hjá tí fakliga ábyrgdaranum m.a. at tryggja, at uppgávurnar verða rætt mannaðar, at starvsfólk fáa hóskandi vegleiðing, og at neyðugt eftirlit verður framt. Ta yvirskipaðu ábyrgdina av manning, vegleiðing og eftirliti hevur fyritøkan.

Uppgávurnar hjá tí fakliga ábyrgdaranum verða sum í dag ásettar í kunngerð sambært § 8, nr. 1, í uppskotinum.

**1.4.5. Góðskuleiðsluskipan**
Skotið verður upp, at fyritøkurnar skulu hava eina góðskuleiðsluskipan. Krøvini til skjalprógv fyri skipanini verða ymisk alt eftir slagnum og støddini á fyritøkuni.

Skipanin, sum skotin verður upp, hevur til endamáls at tryggja, at eltrygdarkrøvini eru lokin í sambandi við innleggingararbeiði. Roknað verður við, at hetta í longdini fer at hava betri eltrygd við sær.

Góðskuleiðsluskipanin byggir á meginregluna í tí vanligu ISO-góðskustýringsskipanini, sum er ætlað at stýra góðskuni á eini framleiðslu, og sum ásetur eina røð av mannagongdum, sum

eru neyðugar fyri at tryggja einsháttaða framleiðslu. Leiðslugóðskipanin, sum skotin verður upp, snýr seg beinleiðis um eltrygd og kann tí avmarkast mótvegis tí vanligu ISO-skipanini.

Í uppskotinum til skipan fer krav m.a. at verða sett um at skráseta gjørd mistøk, so at til ber at læra av teimum og sleppa undan teimum í framtíðini. Ábyrgdarin skal hava møguleika at eftirkanna verkætlanir, soleiðis at tær ikki stríða ímóti tekniskum ásetingum í standardum fyri elinnlegging. Krav verður sett um, at ábyrgdarin skal halda sína útbúgving dagførda, og at uppgávurnar hjá starvsfólkum skulu hóska saman við teirra førleikum. Krav verður eisini sett um, at avhending av ábyrgd og skyldum hjá einum ábyrgdara skal vera skrivlig, og at ábyrgd og skyldur bara kunnu avhendast starvsfólkum við førleikum. Er fyritøkan heilt stór ella organisatoriskt torgreidd, verður skotin upp ein avhendingarskylda. Hetta fyri at tryggja, at eftirlitsuppgávur o.a. verður lokið.

Munurin millum stórar og smáar fyritøkur er serliga viðkomandi í sambandi við kravið um skjalprógv fyri, hvussu krøvini eru lokin. Er talan um eina lítla fyritøku, har ábyrgdarin sjálvur eigur fyritøkuna og kunnar starvsfólkið væl, krevjast vanliga ikki stórvegis formlig skjalprógv. Er talan hinvegin um eina stóra fyritøku við nógvum starvsfólkum, krevjast skrivlig skjalprógv fyri næstan øll krøvini. Avgerandi fyri, um fyritøkan fellur í annan ella hin bólkin, er í royndum, um ábyrgdarin megnar at varðveita yvirlitið yvir uppgávurnar og starvsfólkini.

Ein fyritøka, sum søkir um løggilding, skal leggja fram skjalprógv fyri, at hon hevur eina góðskuleiðsluskipan. Elnevndin ella ein av Elnevndini góðkendur eftirkanningarinstansur góðkennir góðskuleiðsluskipanina og eftirkannar hana leypandi.

Í § 13, stk. 3, í uppskotinum er ásett, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um innihaldið í góðskuleiðsluskipanini.

Ætlanin er, at heimildin skal nýtast til at áseta reglur um góðskuleiðsluskipanirnar hjá fyritøkunum, m.a. at skipanin skal fevna um tað løggildingarfevnda arbeiðið hjá fyritøkuni og lýsa, hvussu fyritøkan er skipað leiðsluliga, ta leiðsluligu ábyrgdina og heimildirnar, sum eru avgerandi fyri, at arbeiðið verður gjørt rætt og lógliga við atliti at trygd, umframt at skipanin í minsta lagi eina ferð um árið skal eftirkannast innanhýsis í fyritøkuni. Harumframt skal heimildin nýtast til at seta krøv um innihaldið í góðskuleiðsluskipanini. Krøvini skulu fevna um stovnanina av skipanini, leiðsluheimildir, manning, vegleiðingar, eftirlit og skjalastýring. Eisini skulu reglur ásetast um, at ein av Elnevndini góðkendur eftiransingarinstansur skal góðkenna og javnan eftirkanna góðskuleiðsluskipanina.

Í § 13, stk. 5, í uppskotinum verður skotið upp, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um akkreditering av eftirkanningarinstansunum, m.a. at eftirkanningarinstansirnir rinda kostnaðin í sambandi akkreditering og eftirkanning av egnum góðskuleiðsluskipanum.

Við akkreditering meinast akkreditering av Den Danske Akkrediterings- og Metrologifond (DANAK) ella einum samsvarandi akkrediteringsstovni.

Hetta er møguleiki, sum kann verða nýttur, og sum kann koma í staðin fyri, at Elnevndin skal góðkenna og eftirkanna eftirkanningarstovnarinstansirnar

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Løggildingarskipanin er gjaldfíggjað burturav, og tí verða ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Fyri landið er avleiðingin naka av meirarbeiðið, sum stendst av, at tað skal gerast ein nýggj løggildingarskipan, har viðkomandi fyritøkur skulu søkja um fyritøkuløggilding og at tær galdandi persónligu løggildingarnar skulu skiftast um við eina góðkenning sum fakliga ábyrgdari.

Uppskotið hevur avleiðingar fyri kommunurnar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Fyri fyritøkurnar er avleiðingin, at tær skulu søkja um fyritøkuløggilding. Eisini skulu persónar við við persónligari løggilding søkja um góðkenning sum fakliga ábyrgdari.

Harumfram skuli viðkomandi fyrtøkur gera eina góðskuleiðsluskipan, sum í eina tíð fer at krevja meira umsitingarligt arbeiði.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

### 2.9. Marknaforðingar
Í mun til galdandi lóg og praksis eru í uppskotinum greiðari reglur um, at eisini fyritøkur, sum ikki hava fastan vinnustað í Føroyum, kunnu gera løggildingarkravd arbeiði í Føroyum við nærri tilskilaðum treytum.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur í sær vanligar revsásetingar fyri brot á nærri tilskilaðr ásetingar í uppskotinum, og heimild at áseta revsing í fyri brot á fyrisitingarliga ásettar reglur.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki í sær ásetingar um satttir og avgjøl.

**2.12. Gjøld**
Eftir § 11 í uppskotinum kann Elnevndin krevja eitt gjald í sambandi við umsóknir um løggilding og góðkenning sum fakligur ábyrgdari umframt eitt árligt gjald fyri at varðveita løggildingina ella góðkenningina.

Landsstýrismaðurin ásetur reglur um støddina á gjøldunum eftir stk. 1, og hvussu tey verða kravd inn.

Eftir § 13, stk. 2, í uppskotinum ber fyritøkan ber kostnaðin, í sambandi við at góðskuleiðsluskipanin hjá fyritøkuni verður góðkend og eftirkannað.

Eftir § 13, stk. 5, í uppskotinum kann landsstýrismaðurin áseta reglur um akkreditering av eftiransingarstovnunum, m.a. at tann einstaki eftiransingarstovnurin ber útreiðslurnar í sambandi við akkreditering og eftirkanning av sínum førleikum og síni góðskuleiðsluskipan.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur likamligum og løgfrøðilgum persónum fráboðanar- og pll´syingarskyldur, sbr. §§ 12, 19 og 22 í uppskotinum.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur fyriutingarligar heimildir til landsstýrismannin og til Elnevndind, sum er nevnd undir landsstýrismanninum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið til § 20 gevur Elnevndini atgongd til privata ogn.

Er illgruni um váða fyri vandamiklum elektriskum innleggingum, skal Elnevndin við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð hava atgongd at almennum og privatum ognum og plássum.

Verður mett, at tað krevst til at fremja munadygt eftirlit við fyritøkum, sum eru fevndar av hesi løgtingslógini, skal Elnevndin somuleiðis við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð hava atgongd at ognum og plássum, haðan fyritøkurnar verða riknar.

Verður mett, at tað krevst til at fremja munadygt eftirlit við fyritøkum, sum er fevndar av hesi løgtingslógini, hevur Elnevndin harumframt við samtykki frá borgara ella fyritøku, sum verða ávirkað, atgongd at øðrum almennum og privatum ognum og plássum.

Eftirlitsmyndugleikin kann heita á løgregluna um at vera sær til hjálpar, tá ið heimildirnar verða útintar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

*Kapittul 1*

*Endamál*

*Til § 1*

Ásetingin er nýggj, við tað at einki endamál er tilskilað í galdandi løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum v. m. (løggildingarlógini).

Á viðmerkingunum til galdandi løggildingarlóg skilst tó, at endamálið við lógini er at tryggja, at elektriskar innleggingar verða rætt gjørdar við atliti at eltekniskari trygd, sbr. tær almennu viðmerkingarnar til lógina, s. 91 í álitinum:

> *"Ynskið um at varðveita eina støðuga og trygga veiting av elektrisiteti og atlitið at trygdini hjá borgarum og teirra ognum hava við sær, at tað ikki er nóg mikið bara at seta krøv til veitingarútbúnaðin og til elektriskt tilfar. Neyðugt er eisini at tryggja, at tey, sum arbeiða upp á elektriskar innleggingar o.a., hava neyðugar tekniskar førleikar og nøktandi kunnleika til galdandi fyriskipanir um innleggingar og tilfar."*

Ætlanin við løggildingarskipanini er ikki at løgskipa góðskuna á tí gjørda innleggingararbeiðinum. Tað eru fyritøkurnar, sum mugu átaka sær ábyrgdina av góðskuni. Tað verður tí mett at vera hóskandi, at endamálið við lógini verður ásett í § 1, soleiðis at tað er greitt, at endamálið við løggildingarskipanini er trygd.

Sostatt verður skotið upp í § 1, at endamálið við løggildingarskipanini er, at innleggingarnar verða rætt gjørdar og serviseraðar fyri at minka um váðan fyri elektriskum stoyti og eldsbruna.

*Kapittul 2*

*Nýtsluøki*

*Til § 2*

Í galdandi løggildingarlóg er nýtsluøkið ásett í §§ 1 og 2.

Í § 1 er ásett, hvørji arbeiðir eru fevnd av lógini og í útgangsstøðinum krevja løggilding.

Løggildingarlógin fevnir um arbeiðir viðvíkjandi elnýtarainnleggingum til sterkstreym. Elnýtarainnleggingar eru innleggingar og útbúnaður í bústøðum, vinnufyritøkum, stovnum o.t.

Sterkstreymur verður í § 1 í galdandi sterkstreymslóg allýstur sum elmegi við so høgum spenningi ella so stórari streymstyrki, at vandi kann standast av.

Í § 2, stk. 1, sbr. § 1, nr. 1-2, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at íbinding í og loysing frá elveitingini og gerð, broyting, útskifting og umvæling av føstum innleggingum við kaðalum,

íbindingarstøðum og øðrum føstum innleggingartilfari bara kunnu verða gjørd undir ábyrgd av persónum, ið hava fingið løggilding sum elinnleggjarar.

Í galdandi løggildingarlóg verður eisini ásett í § 2, stk. 2, sbr. § 1, nr. 3-5, at umframt løggildar innleggjarar kunnu persónar ella virkir, sum vinnuliga framleiða, umvæla ella halda við líka stýrings- ella reguleringsskipanir, maskinur og nýtslutir, um tann, sum ger arbeiðið, hevur neyðugan serkunnleika, leggja inn, broyta og umvæla ikki-sterkstreymsriknar stýrings- og reguleringsskipanir, sum verða nýttar til at stýra sterkstreymsútbúnaði, gera fastar íbindingar og úrbindingar av elektriskum maskinum, nýtslulutum og hjálpartólum, og hava eftirlit við, stilla og umvæla elektriskar maskinur og nýtslulutir, sum eru íbundin í fasta innlegging, meðan arbeiðið verður gjørt.

Við ikki-sterkstreymsriknum stýrings- og reguleringsskipanum meinast veikstreymsrikin útgerð, sum verður nýtt saman við sterkstreymsriknari útgerð. Hetta er útgerð, sum verður løgd inn í bústaðir til at stýra eitt nú ljósi, vaskimaskinum o.ø. sonevndum *smarthouse*-innleggingum.

Sambært viðmerkingunum í álitinum er ikki neyðugt fult og heilt at halda fast við kravið um løggilding, tá ið talan er um arbeiðini, sum nevnd verða í § 2, stk. 2, sbr. § 1, nr. 3-5. Krav verður bara sett um, at persónurin ella fyritøkan vinnuliga framleiðir, umvælir ella heldur við líka elektrisk tól, og at persónurin, sum ger arbeiðið, hevur neyðugan fakligan førleika.

Í § 2, stk. 3, í galdandi løggildingarlóg er harumframt ásett, at ein og hvør, ið hevur neyðugan kunnleika til at gera arbeiðið, kann skifta út normaltættar avbrótarar og stikkkontaktir uttan jørð upp í í mesta lagi 250 V og seta upp og taka niður ljósútbúnað í íbúðum, um arbeiðið ikki verður gjørt við vinnuligum endamáli.

Treytað av, at arbeiðið ikki verður gjørt við vinnuligum endamáli, kann ein og hvør gera arbeiðini, sum eru nevnd í § 2, stk. 3. Atgongdin er ikki avmarkað til egnan bústað. Talan skal bara ikki vera um vinnu. Tað einasta kravið, ið verður sett, er, at viðkomandi hevur neyðugan kunnleika til at gera arbeiðið.

*Stk. 1*

Skotið verður upp at orða eina nýggja áseting um tað løggildingarfevnda arbeiðsøkið, soleiðis at lagt verður upp fyri, at arbeiðsøkið broytist við tíðini og í dag eisini kann fevna um ávísar kanningar av elinnleggingum, har talan ikki er um at gera, broyta ella umvæla.

Í § 1, nr. 3, sbr. § 2, stk. 2, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at bara løggildir persónar og – tá ið tann, ið útinnir arbeiðið, hevur neyðugan serkunnleika - persónar ella fyritøkur, ið vinnuliga framleiða, umvæla ella halda við líka stýrings- ella reguleringsskipanir, maskinur og nýtslulutir, kunnu leggja inn, broyta og umvæla ikki-sterkstreymsriknar stýringsskipanir, sum verða nýttar til at stýra sterkstreymsútbúnaði.

Í stk. 1 í uppskotinum verður skotið upp at áseta, at bara elinnleggingarfyritøkur við løggilding eftir § 4, stk. 1, kunnu gera og servisera allar elektriskar innleggingar til sterkstreym umframt innleggingar av ikki-sterkstreymsriknum stýrings- og reguleringsskipanum, sum verða nýttar til at stýra sterkstreymsútbúnaði.

Galdandi lóg nýtir hugtøkini *gerð*, *broyting*, *útskifting* og *umvæling*. Skotið verður upp at lata orðini *gera* og *servisera* loysa hesi hugtøkini av. Orðið *servisera* fevnir bæði um at broyta, at skifta út, at umvæla, at halda við líka, at hava eftirlit við, at tillaga og at kanna elinnleggingar.

Skotið verður upp at broyta orðið *elnýtarainnleggingar* til *innleggingar*. Við hesum verður gildisøkið hjá lógini víðkað nakað, við tað at lógaruppskotið eisini skal fevna um innleggingar aðrastaðni enn hjá tí veruliga endabrúkaranum, til dømis innleggingar í transformararúmum.

Við hesum verður lagt upp fyri eini gongd á marknaðinum, har ymisk sløg av servisering kunnu verða boðin fram. Við at biðja eina elinnleggingarfyritøku um eina elkanning ber til hjá brúkarum at fáa kannað, um elinnleggingin í eini ogn er lóglig. Við ásetingini verður nágreinað, at hetta slagið av arbeiði er fevnt av løggildingarkravinum.

Í staðin fyri heitið *elinnleggjari*, sum verður nýtt í § 2 í galdandi lóg, verður skotið upp at nýta heitið *elinnleggingarfyritøka*, so tað verður greitt, at talan er um eina fyritøkuløggilding.

*Stk. 2*
Í stk. 2 verður skotið upp, at tað løggildingarfevnda arbeiðið verður roknað frá og við fastari íbinding í ella úrbinding úr elveitingarútbúnaði og fevnir um fastar kaðalskipanir, talvur, málarar, íbindingarstøðir og annað fast innleggingartilfar umframt fasta íbinding og úrbinding av elektriskum maskinum og brúkslutum.

Føst íbinding í elveitingarútbúnað fer fram, tá ið ein stikkkaðal verður bundin í kaðalskápið, sum stendur við vegin. Vanliga verður stikkkaðalin førdur úr kaðalskápinum í elmálaran á ognini. Talan er eisini um fasta íbinding, tá ið t.d. ein sólselluskipan verður bundin í elinnleggingina á ognini.

Netfeløgið (SEV) setur kaðalskápini upp, og kaðlarnir, sum leiða elektrisitetið úr elveitingarútbúnaðinum í kaðalskápið, eru ikki fevndir av lógini.

Við elveitingingarútbúnaði meinast annars alt slag av útbúnaði, sum framleiðir el, t.d. eina monteraða sólselluskipan, ein generator ella eina vindmyllu.

Við úrbinding meinast, at stikkkaðalin úr eini ogn verður loystur úr kaðalskápinum. Eitt nú tá ið umfatandi broytingar skulu gerast í eini innlegging ella ein ogn skal takast niður, má innleggingin loysast úr elveitingarútbúnaðinum.

Við føstum kaðalskipanum meinast elkaðlar, sum kunnu verða settir upp í ella á veggjum, gólvum og loftum. Hesar ber ikki til at taka við sær, tá ið flutt verður av eini ogn. Verndarútgerð, t.e. sikkringar, RCD-útbúnaður ella annað slag av feilstreymsavbrótara, er bygd inn í talvuna á eini ogn.

Við íbindingarstøðum og øðrum føstum innleggingartilfari meinast stikkkontaktir, avbrótarar og lampuúttøk, sum fakfólk nevna dósir.

Við fastari íbinding av elektriskum maskinum og nýtslulutum meinast allar íbindingar, har stikkproppur ikki verður nýttur. Arbeitt verður í tí føstu innleggingini, tá ið t.d. ein vaskimaskina við ongum stikkproppi verður íbundin. Tað kemur ofta fyri, at t.d. komfýrar og elradiatorar eru fast íbundnir, av tí at teir ikki hava havt stikkpropp.

Ætlanin við ásetingunum í stk. 1 og 2 er ikki at gera nakra broyting í tí løggildingarfevnda arbeiðinum í mun til galdandi løggildingarlóg. Við uppskotinum verður nágreinað, at eisini tað at servisera elinnleggingar er løggildingarfevnt arbeiði.

*Stk. 3*
Skotið verður upp, at § 2, stk. 2, sbr. § 1, nr. 3, í galdandi løggildingarlóg heldur fram í § 2, stk. 3, sum sostatt ásetur sum undantak í § 2, stk. 1, at fyritøkur, sum vinnuliga framleiða ella servisera stýrings- og reguleringsskipanir, sum verða nýttar til at stýra sterkstreymsfunktiónum, hóast stk. 1 kunnu leggja inn og servisera ikki-sterkstreymsriknar stýrings- og reguleringsskipanir.

Ásetingin fevnir um fyritøkur, ið vinnuliga framleiða ella servisera stýrings- og reguleringsskipanir, sum verða nýttar til at stýra sterkstreymsfunktiónum, og tí mugu metast at hava ta neyðugu fakligu vitanina, sum gevur teimum førleika at leggja inn og servisera ikki-sterkstreymsriknar stýrings- og reguleringsskipanir.

*Stk. 4*
Í § 2, stk. 2, sbr. § 1, nr. 4 og 5, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at bara løggildir elinnleggjarar og - tá ið viðkomandi, ið ger arbeiðið, hevur neyðugan serkunnleika - persónar ella fyritøkur, ið vinnuliga framleiða, umvæla ella halda við líka maskinur og nýtslulutir, kunnu gera fasta íbinding og úrbinding av elektriskum maskinum, nýtslulutum og hjálpartólum og hava eftirlit við, stilla og umvæla elektriskar maskinur og nýtslulutir, ið eru bundin í fasta innlegging, meðan arbeiðið er í gerð.

Skotið verður upp at varðveita atgongdina hjá fyritøkum, ið vinnuliga framleiða, umvæla ella halda við líka maskinur og nýtslulutir, at gera fasta íbinding og úrbinding og servisera maskinur og nýtslulutir. Sostatt verður eingin innihaldslig broyting gjørd í mun til galdandi lóg.

Ásetingin fevnir um fyritøkur, ið vinnuliga framleiða ella servisera elektriskar maskinur og nýtslulutir og mugu metast at hava ta neyðugu fakligu vitanina, sum gevur teimum førleika at gera fasta íbinding og úrbinding og servisera elektriskar maskinur og nýtslulutir. Sum dømir um elektriskar maskinur kunnu nevnast ventilatiónsútbúnaður ella framleiðslumaskinur á eini verksmiðju. Sum dømi um brúkslutir kunnu nevnast harðar hvítvørur. Tað merkir, at seljarar av hørðum hvítvørum, sum vinnuliga umvæla t.d. vaskimaskinur og hava servitan á økinum, kunnu binda vaskimaskinur í.

*Stk. 5*
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóg.

Eftir uppskotinum kunnu talvuframleiðarar umvæla, viðlíkahalda, hava eftirlit, tillaga og kanna innleggingartalvur, men vegna lága kortslutningseffet í Føroyum, fevnir tað ikki um gera fasta íbinding og úrbindinding, broyting ella útskifting av innleggingartalvum

Hetta er víðking av undantøkum frá løggildingarkravinum í mun til galdandi lóg.

Við at avmarka talvuarbeiðið til hesar fakbólkarnar verður lagt upp fyri vandanum fyri brunaóhappum, sum fáa alsamt størri avleiðingar, sum talvurnar fáa størri orku.

Avmarkingin er einans galdandi fyri installatiónstalvur og tí ikki fyri eitt nú stýritalvur til maskinur. Hesar talvurnar eru fevndar av stk. 3, soleiðis at virkir, sum vinnuliga fáast við at

umvæla hesar talvurnar og halda tær við líka, eisini hava til rætt at arbeiða upp á tær uttan løggilding. Eru hesi bæði talvusløgini samanbygd, kann maskinvirkið tó einans gera inntriv í maskintalvuna, um hon er avbyrgd frá økinum hjá installatiónstalvuni.

*Stk. 6*
Tað verður mett at vera hóskandi, at lógin greitt ásetur, at ávísar elektriskar innleggingar ikki eru fevndar av lógini.

Skotið verður upp, at elektriskar innleggingar umborð á skipum, flogførum og akførum verða undantiknar lógini. Undantakið fevnir ikki um húsbátar, húsvognar og búvognar.

*Til § 3*

Í § 1, nr. 1-5, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at lógin fevnir um elnýtarainnleggingar til sterkstreym og um arbeiðini, sum nevnd eru § 1, nr. 1-5.

Í § 2, stk. 1- 3, sbr. § 1, nr. 1-5, í galdandi løggildingarlóg er ásett, hvørji arbeiðir eru undantikin løggildingarkravinum, og í uppskotinum er ásett, hvørji arbeiðir eru undantikin løggildingarkravinum eftir § 2, stk. 3- 5, í uppskotinum.

*§ 3, nr. 1 og 2*
Í § 3, stk. 1, nr. 1-2, verður skotið upp, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um undantøk frá løggildingarkravinum fyri framleiðarar, tá ið teir gera fastar elektriskar innleggingar í ídnaðarliga framleiddum flytførum eindum (nr. 1), og tá ið teir í sambandi við gerð av bygningslutum fyrireika elektriskar innleggingar (nr. 2). Við fyrireiking av elektriskum innleggingum meinast, at ein partur av innleggingini verður gjørdur, uttan at bundið verður í.

Hetta er nýggj áseting, sum víðkar møguleikan hjá fyritøkum, sum ikki eru løggildar, at gera arbeiðir, sum eru fevnd av § 3, stk. 1, nr. 1 og 2, í uppskotinum.

Endamálið við heimildini í nr. 1 og 2 er, at landsstýrismaðurin skal kunna áseta reglur um undantøk frá løggildingarkravinum fyri framleiðarar, tá ið teir gera fastar elektriskar innleggingar í ídnaðarliga framleiddum flytførum eindum, og tá ið teir í sambandi við gerð av nýggjum bygningslutum fyrireika elektriskar innleggingar.

Roknast kann við, at tørvur verður á at tillaga møguleikarnar at geva undantøk, so hvørt sum nýggj sløg av flytførum eindum ella bygningslutum verða ment, og har tað við atliti at trygd er viðkomandi og ráðiligt, at framleiðarin fyrireikar ta elektrisku innleggingina. Gera serligar umstøður seg galdandi fyri ávís sløg av flytførum eindum ella fyri ávísar bygninglutir, kann leggjast upp fyri hesum í kunngerð.

Eitt atlit, sum kann fáa landsstýrismannin at áseta undantak frá løggildingarkravinum fyri eina flytføra eind, kann vera, at gongdin í ES kann hava við sær, at lutir, sum vanliga hava verið fataðir sum bygningar við føstum innleggingum, verða framleiddir uttan at brúka løggildar fyritøkur. Er tað ráðiligt við atliti at trygd, er rímiligt, at føroyskar fyritøkur, sum framleiða samsvarandi lutir at nýta í Føroyum ella at útflyta, eisini kunnu gera ta elektrisku innleggingina uttan løggilding.

Undantøk frá løggildingarkravinum kunnu bara ásetast fyri flytførar eindir, sum eftir eini ítøkiligari meting ikki verða nýttar sum fastir bygningar. Talan kann t.d. vera um húsvognar, pylsuvognar, skúrvognar, bingjur, bókasavnsbussar, flytførar klinikkir til at kanna fólk og dýr, flytføran útbúnað til skeinking og servering ella flytfør vesir og baðirúm.

Eitt atlit, sum kann fáa landsstýrismannin at áseta undantak frá løggildingarkravinum fyri ein bygningslut, kann vera, at løggildingarkravið ikki skal forða fyri byggiháttum, har ein framleiðari eftir eini ítøkiligari meting og á ein við atliti at trygd ráðiligan hátt kann gera ta elektrisku innleggingina, í sambandi við at bygningsluturin verður framleiddur á einum virki uttan at brúka eina løggilda elinnnleggjarafyritøku. Talan kann t.d. vera um rør og dósir, sum verða stoypt inn í undanframleiddar bygningslutir, fasta innlegging í undanframleiddar køkar og baðirúm ella fasta innlegging í glasskáp, diskar og køksskáp, sum verða sett føst í bygningin.

Nýggjar flytførar eindir ella nýggir byggihættir kunnu koma fram, har eitt undantak frá løggildingarkravinum kann møta einum nýggjum tørvi á marknaðinum, uttan at slakað verður viðvíkjandi trygdini. Heimildarásetingin í nr. 1 og 2 skal tí tryggja smidleika á økinum

*§ 3, nr. 3*

Í § 2, stk. 3, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at ein og hvør við tí neyðuga kunnleikanum til at gera arbeiðið kann skifta út normaltættar avbrótarar og stikkkontaktir uttan jørð upp í í mesta lagi 250 V og seta upp og taka niður ljósútbúnað í íbúðum, um arbeiðið ikki verður gjørt við vinnuligum endamáli.

Í nr. 3 verður skotið upp, at landsstýrismaðurin skal kunna áseta reglur um undantøk frá løggildingarkravinum fyri einføld arbeiðir.

Endamálið við heimildini er at geva landsstýrismanninum møguleika at áseta reglur um undantøk frá løggildingarkravinum fyri einføld arbeiðir, sum brúkarin sjálvur ella fyritøkur við ongari løggilding kunnu gera.

Roknast kann við, at tørvur verður á at tillaga møguleikarnar at geva undantøk, so hvørt sum nýggj sløg av eltilfari verða ment, sum við atliti at trygd á fullgóðan hátt kunnu verða innløgd við ongari løggilding. Gera serligar umstøður seg galdandi fyri ávís sløg av eltilfari, ber somuleiðis til at leggja upp fyri tí í kunngerð.

Eitt atlit, sum kann fáa landsstýrismannin at áseta undantak frá løggildingarkravinum, kann vera, at nýggj sløg av eltilfari ella nýggjar elframleiðslur verða ment, sum við ongum váða kunnu verða løgd inn við ongari løggilding. Er tað ráðiligt við atliti at trygd at lata brúkaran sjálvan ella eina fyritøku við ongari løggilding gera eitt ítøkiligt elarbeiði, eiga reglurnar at geva møguleika fyri hesum.

Talan kann t.d. vera um undir nærri avmarkaðum umstøðum at skifta út avbrótarar og stikkkontaktir ella seta upp og taka niður lampur.

Ætlanin er, at tað í kunngerð verður ásett, at ein og hvør við tí neyðuga kunnleikanum skal kunna skifta út avbrótarar og stikkkontaktir uttan jarðsamband upp í í mesta lagi 250 V, um hylkiskravið ikki fer upp um IP20. Stikkkontaktir við jarðsambandi kann ein og hvør við tí

neyðuga kunnleikanum til at gera arbeiðið skifta, um hylkisskravið ikki fer upp um IP20, um innleggingin er vard við RCD - avbrótara.

Eisini er ætlanin at áseta í kunngerð, at ein og hvør við tí neyðuga kunnleikanum til at gera arbeiðið skal kunna seta upp og taka niður ljósútbúnað, har hylkiskravið ikki fer upp um IP20, m.a. í baðirúmum.

Harumframt kann verða ásett í kunngerð, at ein og hvør við tí neyðuga kunnleikanum at gera arbeiðið skal kunna broyta og umvæla ikki-sterkstreymsriknar stýrings- og reguleringsskipanir, sum verða nýttar til at stýra sterkstreymsvirksemi.

Nýtt eltilfar fer áhaldandi at koma fram, har undantak kann verða ásett, uttan at slakað verður viðvíkjandi trygdini. Heimildarásetingin skal tí tryggja smidleika á økinum.

Eftir § 2, stk. 4, í galdandi løggildingarlóg ásetur landsstýrismaðurin reglur um upplýsingarskyldu fyri tey, sum selja eltilfar, viðvíkjandi tilfari, ið bara løggildir elinnleggjarar kunnu leggja inn, sbr. § 1, nr. 2, í lógini, og viðvíkjandi brúkaravegleiðing um uppseting av elektriskum tilfari.

Bakstøðið fyri hesi heimildini í galdandi løggildingarlóg er, at handlar selja kaðlar og annað tilfar til fasta innlegging í smásølu, og at hetta kann geva brúkaranum ta fatan, at hann sjálvur kann leggja tilfarið inn. Heimildin er nýtt í kunngerð nr. 176 frá 21. september 1993 um sølu av elinnleggingartilfari til nýtarar.

Kunningartiltøk frá annaðhvørt Elnevndini ella myndugleikanum við tí dagligu umsitingini verða mett at hóska betur til at geva brúkarunum tær neyðugu upplýsingarnar á nóg fjølbroyttan hátt. Hetta tí at tað eru fleiri tættir, sum gera av, um brúkarin sjálvur kann leggja viðkomandi eltilfar inn. T.d. er ætlanin at áseta í kunngerð, at stikkkontaktir bara kunnu skiftast út á støðum, har hylkiskravið ikki fer upp um IP20. Tað kann vera torført at kunna um hetta við skelting o.ø. í handlinum.

Sostatt verður skotið upp, at heimildin í § 2, stk. 4, í galdandi løggildingarlóg ikki skal halda fram.

*Stk. 2*

Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin skal kunna áseta reglur um innlegging og servisering av ikki-konventionellum elframleiðandi útbúnaði og reglur um undantøk frá løggildingarkravinum fyri slíkan útbúnað.

Orkuverk eru elframleiðandi útbúnaður, sum veitir nógvum brúkarum streym. Við ikki-konventionellum elframleiðandi útbúnaði meinast t.d. húsvindmyllur ella sólselluútbúnaður, har talan er um desentrala framleiðslu.

Endamálið við heimildini er at geva landsstýrismanninum møguleika at áseta reglur um innlegging og servisering av elframleiðandi útbúnaði, sum ikki av sær sjálvum hóskar saman við verandi regluverki, við tað at talan er um heilt nýliga mentan útbúnað, sum víkir munandi frá teimum konventionellu orkuverkunum, t.d. elorkuverkum. Hetta er t.d. galdandi fyri húsvindmyllur og sólselluútbúnað. Tá ið reglur verða ásettar, kann verða umhugsað, um fyritøkur við ongari løggilding, t.d. fyritøkur, sum vinnuliga framleiða ella servisera tann

viðkomandi desentrala elframleiðandi útbúnaðin og tí hava ein serligan fakkunnleika og serligan kunnleika til útbúnaðin, skulu kunna leggja útbúnaðin inn og servisera hann.

Roknað verður við, at tørvur verður á at áseta reglur, so hvørt sum nýggj sløg av elframleiðandi útbúnaði verða ment. Heimildin skal tí tryggja smidleika á økinum.

*Kapittul 3*

*Løggilding og góðkenning*

*Løggilding*

*Til § 4*

Galdandi løggildingarskipan er, sum lýst í teimum almennu viðmerkingunum, ein persónsløggildingarskipan.

Treytirnar fyri at fáa løggilding eru ásettar í § 4 í galdandi løggildingarlóg.

Tann persónliga løggildi elinnleggjarin hevur eina serliga persónliga revsiábyrgd. Hetta er galdandi í sambandi við vantandi vegleiðing og eftirlit, tá ið tann persónliga løggildi elinnleggjarin ger løggildingarfevnt arbeiði, og tá ið hann tekur ábyrgd av arbeiði, sum persónar, sum ikki eru í starvi hjá fyritøkuni, gera.

Fyri at nútímansgera skipanina verður skotið upp at seta í gildi eina fyritøkuløggildingarskipan, har tað er ein treyt fyri at fáa løggilding, at ein persónur er knýttur at fyritøkuni sum fakligur ábygdari. Samstundis verður skotið upp at strika ta persónligu løggildingina. Við hesum verður tann fíggjarliga og fakliga ábyrgdin savnað í fyritøkuni, soleiðis at tað er fyritøkan, sum hevur ta fullu ábyrgdina, samstundis sum tað framvegis verður tryggjað, at tann neyðugi fakligi førleikin er til staðar í fyritøkuni.

Í § 8, nr. 1, verður skotið upp at geva landsstýrismanninum heimild at áseta reglur um uppgávurnar hjá tí fakliga ábyrgdaranum í løggildum fyritøkum. Ætlanin er at fremja heimildina í kunngerð og áseta, at tann fakligi ábyrgdarin skal hava til uppgávu at tryggja, at uppgávurnar verða rætt mannaðar, at starvsfólk fá neyðuga vegleiðing, umframt at hann skal hava neyðugt eftirlit við, hvussu arbeiðið verður gjørt. Fyritøkan hevur ta yvirskipaðu ábyrgdina av, hvussu uppgávur verða mannaðar, vegleiðing og eftirliti.

Tað eru persónar, sum Elnevndin hevur góðkent sambært § 7 í uppskotinum, sum kunnu virka sum fakligir ábyrgdarar. Elnevndin skal bara góðkenna persónin eina ferð, og góðkenningin hevur síðan gildi, uttan so at hon fellur burtur eftir § 15 í uppskotinum ella verður frádømd eftir reglunum í § 79 í revsilógini. Góðkenningin er sostatt ikki knýtt at løggildingini hjá fyritøkuni. Tað merkir, at ein persónur ikki aftur skal søkja um góðkenning, um hann skiftir starv. Sambært § 12 í uppskotinum skal fyritøkan í sambandi við nýsetan bara boða Elnevndini frá, hvør er settur sum fakligur ábyrgdari, so kannað kann verða eftir, um fyritøkan hevur ein fakligan ábyrgdara, sum Elnevndin hevur góðkent.

Av tí at skotið verður upp at strika ta persónligu løggildingina, verður somuleiðis skotið upp at strika ta omanfyri umrøddu persónligu revsiábyrgdina. Við hesum fáa fyritøkurnar størri smidleika og betri møguleika at leggja arbeiðið til rættis, við tað at tørvur ikki verður á neyvum

innanhýsis reglum um avhending av ábyrgdini. Hevur fyritøkan gjørt innleggingar, sum eru ímóti teimum teknisku ásetingunum, verða tað í framtíðini tær vanligu revsirættarligu meginreglurnar fyri vali av ábyrgdarsubjekti, sum gera av, um ábyrgd umframt fyritøkuábyrgdina skal gerast galdandi mótvegis tí fakliga ábyrgdaranum.

*Nr. 1.*
Eftir nr. 1 er tað ein treyt fyri at fáa løggilding, at ein ella fleiri fakligir ábyrgdarar eru í fyritøkuni, sum eru góðkendir sambært § 7 í uppskotinum og knýttir at fyritøkuni sum starvssettir, sum einaeigarar av einstakligsfyritøku ella sum luttakarar í íognarfelag ella kommandittfelag. Við hesum verður tað greiðari, at eisini yvirskipað starvssett, t.d. stjórar, kunnu verða fakligir ábyrgdarar. Hetta svarar til tað, sum í dag er galdandi, í teimum førum har løggildingin er latin einum persóni, sum er í starvi hjá einum virki ella felag, sum rekur innleggingarvirksemi.

*Nr. 2*
Í nr. 2 verður skotið upp, at ein fyritøka sum treyt fyri at fáa løggilding skal hava eina góðkenda góðskuleiðsluskipan.

Tær nærri reglurnar um, hvussu góðskuleiðsluskipanin skal verða tilevnað, verða at áseta í kunngerð. Hugtakið *góðkenning* fevnir eisini um fyrbilsgóðkenning.

Hetta hevur samband við, at ein nýggj fyritøka ikki hevur eina fult útbygda góðskuleiðsluskipan, við tað at skipanin verður útbygd, so hvørt sum uppgávurnar verða loystar. Tí fer krav at verða sett um, at ein fyritøka, sum søkir um løggilding, skal leggja váttan við um, at fyritøkan hevur søkt ein eftiransingarstovn, sbr. § 13 í uppskotinum um góðskuleiðsluskipanina, um góðkenning av góðskuleiðsluskipanini, og at eftiransingarstovnurin við eini fyribilsgóðkenning hevur mett skipanina at vera fullgóða. Eftiransingarstovnurin skal síðan góðkenna skipanina endaliga, í seinasta lagi eitt ár eftir at løggildingin er givin.

*Nr. 3*
Skotið verður upp, at ein fyritøka sum treyt fyri at fáa løggilding ikki skal vera undir trotabúsviðgerð ella avtøku. Ásetingin er framhald av § 4, stk. 1, nr. 3, í galdandi løggildingarlóg.

*Nr. 4.*
Skotið verður upp sum treyt fyri at fáa løggilding, at gjald er rindað. Ásetingin er framhald av ásetingini í § 3, stk. ,3 í galdandi løggildingarlóg. Gjaldið verður ásett soleiðis, at tað rindar fyri kostnaðin av at umsita skipanina. Sí nærri um hetta í viðmerkingunum til § 11.

*Nr. 5*
Skotið verður upp at orða nr. 5 í uppskotinum á sama hátt sum § 4, stk. 1, nr. 2, í galdandi lóg og at allýsa fastan vinnustað í stk. 2, sbr. viðmerkingarnar til stk. 2.

*Stk. 2*
Sambært § 4, stk. 1, nr. 2, í galdandi løggildingarlóg er tað ein treyt fyri at fáa løggilding, at umsøkjarin hevur fastan vinnustað við telefon í Føroyum.

Í § 4, stk. 3, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at Elnevndin kann geva undantaksloyvi frá treytunum í stk. 1, nr. 1-5, m.a. treytini um fastan vinnustað við telefon í Føroyum. Ásett er eisini, at tað bara er, tá ið serlig viðurskiftir tala fyri tí, at vikið kann verða frá treytini í nr. 1 um at standa eina roynd, sum landsstýrið hevur góðkent.

Ásetingin setur sostatt krav um ávísa stovnseting í Føroyum ella tilknýti til Føroyar.

Tað skilst ikki greitt, hvørki á ásetingini ella á viðmerkingunum til uppskotið til galdandi løggildingarlóg, hvørji krøv til tilknýti verða sett við orðingini *fastan vinnustað við telefon*. Tó stendur á s. 98 í viðmerkingunum í álitinum:

> ”*Det må dog understeges, at nr. 2 ikke stiller krav om “værksted”, men alene om “forretingssted”. Installatørvirksomheders værksted findes i dag ofte i virksomheders biler, hvor værktøj, måleudstyr m.v. er placeret*.”

Um møguleikan fyri fráviki verður í álitinum sagt:

> *“Beføjelsen til at dispensere for opfyldelsen af de i stk. 1 opregnede krav ligger hos elnævnet. Betingelserne for meddelelse af dispenssation med hensyn til uddannelseskrav i stk. 1 er mere restriktive end betingelserne for dispensation for de øvrige opregnede krav. Denne forskel er særlig begrundet i sikkerhedsmæssige forhold.”*

Elnevndin hevur havt einstøk mál um frávik frá kravinum um fastan vinnustað. Í avgerðini niðanfyri varð sýtt fyri fráviki:

> *“Eftir § 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 um løggilding av elinnleggjarum v. m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, verður løggilding givin, tá ávísar nærri ásettar treytir eru loknar, herundir, at umsøkjarin skal hava fastan vinnustað við telefon her í landinum.*
>
> *Eftir § 2 í kunngerð nr. 174 frá 21. september 1993 um løggilding av elinnleggjarum kann løggilding annaðhvørt verða latin persóni, ið ætlar sær sjálvur at reka innleggingarvirksemi, ella einum, sum er settur í virki ella felag, ið rekur innleggingarvirksemi. Tann løggildi skal starvast fulla tíð í virkinum.*
>
> *Kravið er sostatt, um tú skal kunna fáa eina løggilding, og tú sjálvur rekur ella í felagsformi rekur elinnleggingarvirksemi í Føroyum, at tú hevur fastan vinnustað her við tlf., og at tú sjálvur starvast fulla tíð í fyritøkuni.*
>
> *Hin møguleikin - men tá fært tú ikki sjálvur løggilding – er, at tú stovnar felag her, sum skal reka elinnleggingarvirksemi, og at ein løggildur elinnleggjari, sum skal starvast fulla tíð í virkinum, er settur í starv í felagnum.*
>
> *Nevndu treytir eru eftir tí, sum er upplýst, ikki loknar.*
>
> *Elnevndin kann geva undantaksloyvi, um serligar grundir eru, men einki er upplýst um tílikar serligar grundir.”*

Rættarstøðan er ógreið, og tí er tørvur á gera reglurnar greiðari.

Skotið verður upp at allýsa fastan vinnustað í stk. 2, og á uppskotinum skilst, at fyritøkan í royndum skal útinna vinnuvirksemi í Føroyum viðvíkjandi gerð og servisering av løggildingarfevndum arbeiði í eitt ikki nærri tilskilað tíðarskeið og við fastari skrivstovu, haðan virksemið viðvíkjandi avtalum o.ø. viðvíkjandi arbeiðinum í royndum skal verða framt.

Sambært uppskotinum skulu tríggjar kumulativar treytir verða loknar.

Í fyrsta lagi skal talan vera um útinning av vinnuvirksemi í Føroyum viðvíkjandi gerð og servisering av løggildingarfevndum arbeiði.

Í øðrum lagi skal virksemið, t.e. gerð ella servisering av innleggingum, fara fram í eitt ikki nærri tilskilað tíðarskeið, t.e., at fyritøkan varandi skal vera til staðar í Føroyum við sínum virksemi.

Í triðja lagi skal vera talan um fastan útbúnað. Tann fasti útbúnaðurin kann t.d. vera ein skrivtova undir leiðslu av starvsettum hjá viðkomandi fyritøku ella einum sjálvstøðugum persóni, sum hevur fingið heimild at virka varandi fyri fyritøkuna, t.d. sum søluumboð. Sostatt er ikki neyðugt, at tann fasti vinnustaðurin er eitt dótturfelag ella ein deild, sum fyritøkan skrásetur í Føroyum.

Henda allýsingin av stovningarhugtakinum *fastur vinnustaður* samsvarar við allýsingina í grein 4, nr. 5, í ES- tænastudirektivinum og verður nýtt í grannalondunum.

Hevur fyritøkan ikki fastan vinnustað, sum lýst omanfyri, kann hon tó fáa løggilding eftir reglunum, sum landsstýrismaðurin ásetur, sbr. viðmerkingarnar til stk. 3.

*Stk. 3*
Í § 4, stk. 1, nr. 5, í galdandi løggildingarlóg er ásett sum treyt fyri at fáa løggilding, at umsøkjarin ikki innan fyri tey seinastu trý árini er revsaður fyri at brot á reglurnar í løggildingarlógini ella løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað ella reglur, sum eru ásettar samsvarandi hesum lógunum, og at løggildingin ikki er tikin aftur.

Eftir galdandi lóg er tað SEV, sum gevur løggilding. At sýta fyri at geva løggilding er eitt stórt inntriv, og eftir § 4, stk. 3, í lógini kann Elnevndin tí gera undantøk frá hesi treytini.

Skotið verður upp, at tann, sum eigur fyritøkuna, ella, tá ið fyritøkan verður rikin í felagsformi, tann fyrisitingarligi stjórin, skal geva skrivliga váttan fyri, um fyritøkan ella viðkomandi sjálvur innan fyri tey seinastu trý árini er revsaður fyri brot á hesa løgtingslógina, ta áður galdandi løgtingslógina um løggilding av elinnleggjarum v.m., ta áður galdandi løgtingslógina um sterkstreymsútbúnað, løgtingslóg um elelektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (eltrygdarlógina) ella reglur ásettar við heimild í hesum løgtingslógunum.

Kravið um tær nevndu upplýsingarnar er týdningarmikið, tí ein trygdarváði kann vera í, at brot áður er framt á lógina. Myndugleikin metir við støði í upplýsingunum, um sýtt eigur at verða fyri at geva løggilding.

Ásetingin í uppskotinum er ein linking í mun til galdandi lóg, sum setur sum krav, at umsøkjarin innan fyri tey seinastu trý árini ikki skal vera revsaður fyri brot á tær nevndu reglurnar. Eftir

uppskotinum skal í staðin váttast skrivliga, um slíkar umstøður eru til staðar. Eru tær tað, skal hetta verða tikið við í metingina, um sýtt eigur at verða fyri umsóknini.

*Stk. 5*
Eftir § 4 í kunngerð um løggilding av elinnleggjarum hevur SEV eina skrá yvir persónar, ið hava løggilding sum elinnleggjarar. Skráin er alment atkomandi á heimasíðuni hjá SEV. Tað verður mett at vera hóskandi at áseta í lógini, at skráin er alment atkomandi á heimasíðuni hjá Elnevndini.

Skotið verður upp at áseta í stk. 4, at Elnevndin førir løggildingarskrá, at fyritøkur, sum eru løggildar sambært stk. 1, verða førdar í skránna, og at skráin er alment atkomandi á heimasíðuni hjá Elnevndini.

*Útinning av virkseminum*

*Til § 5*

Sambært § 3, stk. 2, nr. 2 og 3, í galdandi løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum v. m kann landsstýrismaðurin í samráð við Elnevndina áseta reglur um treytirnar, ið skulu galda fyri løggilding, m.a. hvussu sambandið skal vera millum tann løggilda og starvsfólk, ið gera arbeiði undir løggildingini. Slíkar reglur eru ásettar í kunngerð um elinnleggingarvirksemi og kunngerð um løggilding av elinnleggjarum.

Reglurnar í kunngerð um elinnleggingarvirksemi og kunngerð um løggilding av elinnleggjarum verða broyttar við nýggjum kunngerðum í samsvari við lógaruppskotið.

Nr . 1
Í nr. 1 verður skotið upp, at landsstýrismaðurin skal kunna áseta reglur um útinning av løggildum virksemi.

Ætlanin er, at heimildin skal setast í verk við eini kunngerð, sum ásetur reglur um útinning av løggildum virksemi, m.a. um, hvørjum gjørdum arbeiðum fyritøkan kann taka ábyrgdina av, um skylduna hjá fyritøkuni at fylgja góðskuleiðsluskipanini í verki, um skylduna hjá fyritøkuni at fylgja leiðbeiningum frá netfelagnum og um skylduna hjá fyritøkuni í sambandi við vanlukkur og eldsbruna.

Nr. 2
Við heimild í § 3, stk. 2, nr. 2, í galdandi løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum er í § 2, stk. 1, í kunngerð um løggilding av elinnleggjarum ásett, at tann løggildi skal starvast fulla tíð í virkinum. Elnevndin hevur tulkað kravið í kunngerðini soleiðis, at elinnleggjarin skal vera til staðar í í minsta lagi 30 tímar um vikuna, í tíðarskeiðnum har starvsfólkini (lærlingar og sveinar) eru til arbeiðis, t.e. í vanligari arbeiðstíð.

Bakstøðið fyri hesum kravinum er, at mett verður, at tann persónliga løggildi skal vera til staðar í fyritøkuni í 30 tímar um vikuna fyri at kunna røkja uppgávurnar, sum hann sum persónliga løggildur hevur ábyrgdina av, m.a. at hava eftirlit við og leiðbeina um tað løggildingarfevnda arbeiðið.

Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um tilknýtið hjá tí fakliga ábyrdgdaranum til fyritøkuna.

Ætlanin er, at heimildin skal setast í verk við kunngerð, sum ásetur krav um, at tann fakligi ábyrgdarin í eitt ávíst tímatal um vikuna skal vera knýttur at fyritøkuni í vanligari viðskiftatíð. Tað er ymiskt frá eini fyritøku til aðra, hvat vanlig handilstíð er, men tann fakligi ábyrgdarin skal vera í fyritøkuni, meðan hon er í rakstri.

Bakstøðið fyri kravinum er, at tann fakligi ábyrgdarin við sínum førleikum er partur av grundarlagnum fyri trygdini viðvíkjandi teimum gjørdu arbeiðunum. Tann fakligi ábyrgdarin skal tí vera vera til staðar fyri at tryggja, at uppgávurnar verða rætt mannaðar, at starvsfólk fáa ta neyðugu leiðbeiningina, og at tað neyðuga eftirlitið verður havt við, hvussu arbeiðið verður gjørt.

Ætlanin er, at tímatalið, sum tann fakligi ábyrgdarin skal vera knýttur at fyritøkuni, verður ásett at vera 30 tímar um vikuna. Heimildin skal tó tryggja smidleika, soleiðis at tilknýtiskravið kann verða lagað til gongdina á arbeiðsmarknaðinum og ikki forðar fyri einum rúmligum arbeiðsmarknaði.

*Til § 6*

*Stk. 1*
Við heimild í § 3, stk. 2, í galdandi løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum v.m. er í § 2, stk. 2, í kunngerð um løggilding av elinnleggjarum ásett, at verður løggildingin givin einum starvsfólki, skal starvsfólkið vera sett sum stjóri ella við starvsmannatreytum smb. løgtingslóg um starvsmenn, og starvsfólkinum skal vera tryggjaður rættur at taka avgerðir viðvíkjandi arbeiðinum, ið lógin fevnir um. Hetta skal verða prógvað við at senda inn sáttmálar o.t. í sambandi við umsóknina.

Skotið verður upp í stk. 1, at fyritøkan skal tryggja, at tann fakligi ábyrgdarin, sbr. § 4, stk. 1, nr. 1 í uppskotinum, hevur tær neyðugu heimildirnar at kunna røkja sínar uppgávur.

Bakstøðið fyri hesum er, at fyritøkan skal geva tí fakliga ábyrgdaranum tær røttu heimildirnar í fyritøkuni, soleiðis at viðkomandi í royndum hevur møguleika at røkja sínar uppgávur. Í mun til galdandi reglur verður ikki kravt, at tann fakligi ábyrgdarin skal hava leiðslustøðu í fyritøkuni. Tað er eftir uppskotinum upp til ta einstøku fyritøkuna, hvørja skipanarliga støðu tann fakligi ábyrgdarin skal hava, bara tað er tryggjað, at hann hevur heimildirnar, sum honum tørvar fyri at kunna tryggja, at uppgávurnar verða rætt mannaðar, at starvsfólkini fáa nóg góða leiðbeining, og at tað neyðuga eftirlitið verður havt við, hvussu arbeiðið verður gjørt.

*Stk. 2*
Á § 3, stk. 2, í galdandi løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum v.m. og § 2, stk. 2, í kunngerð um løggilding av elinnleggjarum skilst, at verður løggildingin givin einum starvsfólki, skal starvsfólkið vera sett við eini uppsagnarfreist, sum svarar til uppsagnarfreistina í starvsmannalógini.

Í stk. 2 verður skotið upp, at er tann fakligi ábyrgdarin knýttur at fyritøkuni sum starvssettur, skal hann vera settur við eini uppsagnarfreist upp á í minsta lagi tríggjar mánaðir eftir seks mánaða starvssetan.

Endamálið við uppsagnarfreistini er at geva tí fakliga ábyrgdaranum eina ávísa vernd, við tað at hann ofta kann vera í eini truplari støðu í fyritøkuni. Tann fakligi ábyrgdarin kann fyri at betra um trygdina kenna seg noyddan at seta fyritøkuni krøv um manning, innkeyp o.a., sum leiðslan í fyritøkuni úr einum fíggjarligum sjónarhorni ikki tekur undir við. Uppsagnarfreistin skal í tílíkum støðum tryggja, at fyritøkan ikki sum einki kann siga tann fakliga ábyrgdaran úr starvi orsakað av eini slíkari ósemju.

Tann fakligi ábyrgdarin er í fleiri førum fevndur av starvsmannalógini, tá ið hann røkir uppgávur viðvíkjandi arbeiðsleiðslu ella eftirliti. Í slíkum førum galda reglurnar í starvsmannalógini fyri tann fakliga ábyrgdaran.

*Góðkenning sum fakligur ábyrgdari*

*Til § 7*

Treytirnar fyri at fáa løggilding eru í dag ásettar í § 4, stk. 1, í løggildingarlógini.

Sum nevnt verður í viðmerkingunum til § 4 í uppskotinum, verður skotið upp at byggja løggildingarskipanina soleiðis upp, at tað verður ein treyt fyri at fáa løggilding, at ein persónur er knýttur at fyritøkuni sum fakligur ábyrgdari.

Skotið verður upp at áseta treytirnar í stk. 1.

Góðkenningin merkir sostatt, at tann gókendi kann virka sum fakligur ábyrgdari í eini fyritøku, sum hevur fingið løggilding eftir § 4.

*Stk. 1, nr. 1*
Eftir uppskotinum er tað ein treyt fyri at fáa góðkenning sum fakligur ábyrgdari, at umsøkjarin hevur staðið eina góðkenda førleikagevandi roynd og lýkur nærri ásett starvskrøv. Tað svarar til tað, sum í dag verður sett sum treyt fyri at verða persónliga løggildur.

Við heimild í § 8, nr. 2, í uppskotinum er ætlanin at áseta í eini kunngerð, hvørjar førleikagevandi royndir og starvskrøv geva atgongd til at søkja um góðkenning sum fakligur ábyrgdari.

*Stk. 1, nr. 2*
Sambært § 4, stk. 1, nr. 4, í galdandi løggildingarlóg skal umsøkjarin skjalprógva, at hann hevur havt í minsta lagi eitt árs tøkniligt starv á einum sterkstreymstøkniligum virki, um fimm ár ella meira eru liðin, síðan hann stóð royndina.

Skotið verður upp, at hetta kravi, sonevnda fyrningarkravið. heldur fram.

*Stk. 1, nr. 3*
Sambært § 4, stk. 1, nr. 3, í galdandi løggildingarlóg skal umsøkjarin vera myndigur og ikki undir verjumáli eftir verjumálslógini § 5 ella samverjumáli eftir verjumálslógini § 7 og hava ræði á sínum búgvi.

Skotið verður upp, at kravið um, at umsøkjarin skal vera myndigur og ikki undir verjumáli ella samverjumáli, heldur fram.

Kravið um, at umsøkjarin skal hava ræði á sínum búgvi, verður ikki mett at vera tíðarhóskandi og viðkomandi longur.

*Stk. 1, nr. 4*
Sambært § 3, stk. 3, í galdandi løggildingarlóg skal gjald vera rindað. Henda ásetingin heldur fram í nr. 4.

*Stk. 2*
Sambært § 4, stk. 1, nr. 5, í galdandi løggildingarlóg, skal umsøkjarin skjalprógva, at hann ikki innan fyri tey seinastu trý árini er revsaður fyri brot á reglurnar í løggildingarlógini og løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað ella reglur ásettar við heimild í hesum lógunum. Løggildingin skal ikki vera tikin aftur.

Skotið verður upp, at tann, sum søkir um at gerast fakligur ábyrgdari, skal geva skrivliga váttan fyri, um fyritøkan ella viðkomandi sjálvur innan fyri tey seinastu trý árini er revsaður fyri brot á hesa løgtingslógina, ta áður galdandi løgtingslógina um løggilding av elinneleggjarum v.m., ta áður galdandi løgtingslógina um sterkstreymsútbúnað, eltrygdarlógina ella reglur ásettar við heimild í hesum løgtingslógunum.

Er viðkomandi revsaður fyri brot á tær nevndu løgtingsógirnar, verður hetta ein partur av metingargrundarlagnum, tá ið Elnevndin metir, um umsøkjarin skal hava noktandi svar. Við hesi ásetingini skilst greitt á lógini, at tað veldst um eina meting, um umsøkjarin skal hava noktandi svar.

*Til § 8*

Sambært § 3, stk. 2, nr. 2, í galdandi løggildingarlóg kann landsstýrismaðurin áseta reglur um, hvørjar treytir skulu galda fyri løggildingina, m.a. um sambandið millum tann løggilda og starvsfólk, sum gera arbeiði undir løggildingini, og um tilknýtið hjá tí løggilda til fyritøkuna.

Tann persónliga løggildingin verður í samsvari við uppskotið um at broyta løggildingarskipanina til eina fyritøkuløggilding avloyst av eini góðkenning sum fakligur ábyrgdari, sbr. viðmerkingarnar til § 4.

*Nr. 1*
Í nr. 1 verður skotið upp, at landsstýrissmaðurin skal kunna áseta reglur um, hvørjar uppgávur tann fakligi ábyrgdarin skal hava.

Slíkar reglur eru í dag ásettar í kunngerð um elinnleggingarvirksemi.

Eftir ætlan verður kunngerðin um elinnleggingarvirksemi avloyst av eini nýggjari kunngerð, sum m.a. ásetur, at tað liggur á tí fakliga ábyrgdaranum at tryggja, at tær løggildingarfevndu uppávurnar hjá fyritøkuni verða rætt mannaðar, at starvsfólk fáa nøktandi leiðbeining, og at nøktandi eftirlit verður havt við, hvussu arbeiðið verður gjørt.

Hetta samsvarar við uppgávurnar hjá tí persónliga løggilda í dag, men nú verða uppgávurnar ætlandi greitt ásettar í kunngerð.

Eftir galdandi reglum hevur tann persónliga løggildi eina serliga persónliga revsiábyrgd í sambandi við mishald av uppgávunum, sbr. part 1.4. í teimum almennu viðmerkingunum. Eftir uppskotinum helddur henda revsiábyrgin ikki fram.

*Nr. 2*
Sambært § 4, stk. 1, nr. 1, í galdandi løggildingarlóg verður løggilding givin, tá ið umsøkjarin hevur staðið eina roynd, sum landsstýrið hevur góðkent, og lýkur starvskrøvini, sum landsstýrið hevur ásett. Nærri reglur eru ásettar í kunngerð nr. 175 frá 21. september 1993 um góðkendar royndir og starvskrøv fyri løggilding av elinnleggjarum.

Skotið verður upp at heimila landsstýrismanninum at áseta reglur um royndir og starvskrøv, sum umsøkjarin skal hava lokið fyri at fáa góðkenning sum fakligur ábyrgdari.

*Nr. 3*
Í dag eru ongar reglur ásettar um persónliga løggilding við støði í útlenskum vinnuførleikum.

Mett verður, at slíkar reglur eiga at verða settar í lógaruppskotið, og at landsstýrismaðurin skal kunna áseta reglur um at útinna vinnu við støði í útlendskum vinnuførleikum.

Skotið verður tí upp, at landsstýrsmaðurin skal kunna áseta reglur um at útinna vinnu sum fakligur ábyrgdari við støði í útlendskum vinnuførleikum, m.a. um forboð fyri fyribils ella tilfallandi útinning av vinnu sum fakligur ábyrgdari, sbr. § 5, stk. 1, nr. 1, fyri persónar, sum ikki lúka førkeikakrøvini.

*Noktan*

*Til § 9*

Eftir § 5 í galdandi løggildingarlóg kann SEV í ávísum førum nokta at geva løggilding.

Áðrenn SEV tekur avgerð eftir § 5, skal málið leggjast fyri Elnevndina. Hetta skilst ikki á lógartekstinum, men á viðmerkingunum til ásetingina.

Í § 5, nr. 1, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at hóast umsøkjarin lýkur treytirnar í § 4 fyri at fáa løggilding, kann løggilding verða noktað, um umsøkjarin við dómi hevur mist rættin at útinna løggilt virksemi, sbr. § 78, stk. 2, í revsilógini.

Tað merkir, at løggilding kann verða noktað tí, sum er dømdur fyri revsiverd viðurskiftir, sum gera, at sannlíkur váði er fyri, at starvið verður misnýtt.

§ 78, stk. 2, í revsilógini er galdandi, uttan mun til um tað er ásett í løggildingarlógini. Skotið verður tí upp, at henda ásetingin í § 5, nr. 1, í galdandi lóg ikki heldur fram.

Rættarstøðan verður verandi óbroytt, og mynduleikin fer framvegis at kunna nokta løggilding ella góðkenning sum fakligur ábyrgdari í førum, har umsøkjarin er dømdur fyri revisverd viðurskiftir, sum gera, at sannlíkur váði er fyri, at starvið verður misnýttt.

*Nr. 1*

Tað er ikki ásett í galdandi løggildingarlóg, at løggilding kann verða noktað einum persóni, sum uttanlands er dømdur fyri brot, sum kunnu javnmetast við tey í § 78, stk. 2, í revislógini nevndu.

Mett verður, at tað eisini eigur at verða møguligt at nokta løggilding ella góðkenning, tá ið umsøkjarin uttanlands er dømdur fyri revsiverd viðurskiftir, sum kunnu javnmetast við tey í § 78, stk. 2, í revsilógini nevndu.

Skotið verður tí upp í nr. 1, at uttan mun til um treytirnar í §§ 4 og 5 fyri at fáa løggilding ella góðkenning sum fakligur ábyrgdari eru loknar, skal Elnevndin kunna nokta, um umsøkjarin uttanlands er komin undir revsitiltøk fyri viðurkskiftir, sum kunnu javnmetast við tey í § 78, stk. 2, í revsilógini nevndu.

*Nr. 2.*

Í § 5, stk. 1, nr. 2, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at hóast umsøkjarin lýkur treytirnar í § 4 fyri at fáa løggilding, kann løggilding verða noktað, um umsøkjarin í starvi ella vinnu annars hevur sýnt slíkan atburð, at orsøk er at halda, at hann ikki fer at reka virkið á fullgóðan hátt.

Í nr. 2 verður skotið upp, at uttan mun til um treytirnar í §§ 4 og 5 fyri at fáa løggilding ella góðkenning sum fakligur ábyrgdari eru loknar, kann Elnevndin nokta at geva løggilding, um umsøkjarin í starvi ella vinnu annars hevur sýnt slíkan atburð, at orsøk er at halda, at fyritøkan ikki fer verða rikin á fullgóðan hátt.

Sambært hesi ásetingini kann verða noktað t.d. í førum, har umsøkjarin orsakað av órøkjuskapi, sum ikki hevur havt revsing við sær, fyrr hevur mist eina løggilding, ella har persónar, sum eru í fyritøkuni, hava verið í eini aðrari fyritøku, sum hevur mist løggildingina og er hildin uppat. Atlit kann takast at umstøðum, sum, við atliti at hvørjar umstøður talan er um, eru innan fyri eitt rímiligt tíðarskeið.

Í § 5, stk. 2, í galdandi løggilddingarlóg er ásett, at fær ein umsókn um løggilding noktandi svar, orsakað av at umsøkjarin í starvi ella vinnu annars hevur sýnt slíkan atburð, at orsøk er at halda, at hann ikki fer at reka virkið á fullgóðan hátt, kann málið verða kært til landsstýrismannin.

Í § 25, stk. 1, í uppskotinum er ásett, at avgerðir hjá Elnevndini eftir hesi lógini ella reglum ásettum sambært hesi lógini ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. Tó kunnu avgerðir um noktan, sum eru grundaðar á umstøður, sum nevndar eru í § 10, stk. 1, nr. 2, leggjast fyri Vinnukærunevndina, sbr. § 25, stk. 2, í uppskotinum.

*Stk. 2*
Er onkur dømdur fyri revisverd viðurskiftir, sum koma undir § 78, stk. 1, í revislógini, skilst á § 78, stk. 3, í revsilógini, at ákærumyndugleikin, eftir áheitan frá tí, sum hevur fingið noktandi svar upp á umsókn um góðkenning ella løggilding, skal leggja spurningin, um tey revsiverdu viðurskiftini skulu hava noktan við sær, fyri rættin.

Í stk. 2 í uppskotinum verður skotið upp, at § 78, stk. 3, í revsilógini skal verða nýtt samsvarandi í sambandi við avgerðir um noktan, um umsøkjarin uttanlands er komin undir revsitiltøk fyri viðurskiftir, sum kunnu javnmetast við tey í § 78, stk. 2, í revsilógini nevndu.

*Undantak*

*Til § 10*

Eftir galdandi løggildingarlóg, § 4, stk. 3, kann Elnevndin geva undantaksloyvi frá treytunum í § 4, stk. 1, nr. 1-5 í lógini. Tá ið talan er um treytirnar í nr. 1 um at standa roynd, kann undantaksloyvi tó bara verða givið, tá ið serlig viðurskiftir tala fyri tí.

Tað verður mett at vera hóskandi, at Elnevndin framvegis skal hava atgongd at gera undantak frá treytunum fyri at fáa fyritøkuløggilding og góðkenning sum fakligur ábyrgdari.

Skotið verður upp, at Elnevndin í serligum førum skal kunna gera undantak frá treytunum, sum nevndar eru í § 4, stk. 1, nr. 1-4, § 5, stk. 1, og § 8, stk. 1, nr. 1 og 2, í uppskotinum, og at landsstýrismaðurin skal kunna áseta nærri reglur um atgongdina at gera undantak frá kravinum í § 4, stk. 1, nr. 1.

Undantak verður gjørt eftir eini ítøkiligari meting av umstøðunum.

Undantak kann t.d verða nýtt í førum, har tann, sum søkir um góðkenning sum ábyrgdari, ikki hevur ta góðkendu royndina, men hóast tað eftir eini ítøkiligari meting má haldast at hava teoretiskar og praktiskar royndir, sum kunnu javnmetast við eina góðkenda roynd.

Eitt annað føri, har undantak kann verða gjørt, er, har ein fyritøkuløggilding er burturfallin orsakað av trotabúsviðgerð. Fyritøkan kann vilja gera løggildingarfevnt arbeiði, sum er í gongd, liðugt fyri at realisera virðið á tí, so at tað kann verða tikið við í trotabúgvið til gagns fyri áognararnar. Í sambandi við eina umsókn um løggilding í slíkum førum kann Elnevndin, alt eftir teimum ítøkiligu umstøðunum, gera undantak frá kravinum um, at fyritøkan ikki skal vera undir trotabúsviðgerð.

Løggildingin er knýtt at persóninum, sum hevur løggildingina. Ber í sambandi við deyða, sjúku, húsagang ella tílíkt ikki til at reka fyritøkuna víðari, kann hetta í ávísum førum kennast órímiligt og hava stóran fíggjarligan miss við sær.

Í § 6 í galdandi løggildingarlóg er tí ásett, at løggildingin fellur burtur, um handhavin av løggildingini doyr ella kropsliga ella rættarliga ikki verður førur fyri at útinna virksemið. Eftir umsókn frá deyðsbúnum, trotabúnum ella tí, sum annars virkar vegna tann løggilda, kann SEV tó geva virkinum bráðfeingis loyvi at halda fram undir eftirliti og ábyrgd hjá øðrum løggildum elinnleggjara. Tílíkt loyvi kann bara verða givið fyri eitt ár. Undir serligum umstøðum kann SEV tó leingja freistina upp í seks mánaðir.

Í dag eru ongar nærri reglur ásettar um møguleikan at fáa loyvi til fyribils at reka fyritøkuna víðari uttan at hava ein persónliga løggildan knýttan at fyritøkuni, men undir eftirliti og ábyrgd hjá øðrum løggildum elinnleggjara.

Tí er torført hjá fyritøkunum at kenna møguleikarnar fyri at fáa undantak í ymsum støðum, sum kunnu taka seg upp, t.d. tá ið tann persónliga løggildi doyr, gerst sjúkur í longri tíð ella fer í barnsburðarfarlovyi.

Tí verður skotið upp, at møgulekin at fáa loyvi fyribils at reka fyritøkuna víðari uttan at hava ein ein persónliga løggildan knýttan at fyritøkuni ikki heldur fram. Í staðin skulu fyritøkurnar í framtíðini søkja um undantak frá kravinum um, at ein fakligur ábyrgdari skal vera knýttur at fyritøkuni.

Samstundis verður skotið upp, at landsstýrismaðurin skal kunna áseta nærri reglur um atgongdina at gera undantak frá kravinum um, at ein fakligur ábyrgdari skal vera knýttur at fyritøkuni.

Við hesum verður rættarstøðan greiðari, og fyritøkurnar hava møguleika at kenna møguleikarnar fyri at fáa undantak í ymsum støðum, sum kunnu taka seg upp.

*Gjald*

*Til § 11*

Í § 3, stk. 3, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at eitt gjald verður kravt fyri at fáa løggilding og eitt árligt gjald fyri at varðveita hana. Landsstýrismaðurin ásetur gjaldið eftir tilmæli frá Elnevndini. Gjaldið er í kunngerð um gjøld fyri løggilding av elinnleggjarum ásett at vera kr. 1.000. Á viðmerkingunum til uppskotið skilst, at inntøkurnar frá gjaldinum skulu fara til Elnevndina, m.a. til upplýsingarvirksemi.

Skotið verður upp, at heimildin at krevja gjøld og heimildin hjá landsstýrimanninum at áseta nærri reglur um gjøld halda fram.

*Kapittul 4*

*Upplýsingarskylda*

*Til § 12*

Sambært § 3 í kunngerð um løggilding av elinnleggjarum skal SEV hava fráboðan um broytingar í arbeiðs- og ábyrgdarviðurskiftunum hjá einum settum løggildum elinnleggjara. Tann løggildi skal annars eftir áheitan frá SEV geva SEV allar upplýsingar um arbeiðs- og ábyrgdarviðurskiftir hjá virkinum.

Góðkenningin sum fakligur ábyrgdari er ikki knýtt at fyritøkuløggildingini. Tann fakligi ábyrgdarin skal tí ikki søkja um nýggja góðkenning, í sambandi við at hann fer í starv hjá aðrari fyritøku.

Sum avleiðing av hesum verður skotið upp, at tann løggilda fyritøkan beinavegin skal boða Elnevndini frá, tá ið ein fakligur ábyrgdari verður knýttur at fyritøkuni. Fyritøkan skal somuleiðis beinanvegin boða Elnevndini frá, tá ið tann fakligi ábyrgdarin fer úr starvi ella ikki verður til staðar í meira enn seks fylgjandi vikur.

Endamálið við ásetingini er, at eftirlit kann verða havt við, at ein fakligur ábyrgdari altíð er knýttur at fyritøkuni.

*Kapittul 5*

*Góðskuleiðsluskipan*

*Til § 13*

Uppskotið til ássetingina í § 13 um góðskuleiðsluskipan er nýggj áseting. Slíkt krav er ikki ásett í galdandi lóg.,

Í stk. 1 verður skotið upp, at ein fyritøka, sum søkir um løggilding eftir §§ 4 og 5, skal leggja fram skjalprógv fyri, at fyritøkan hevur eina góðkenda góðskuleiðsluskipan. Góðskuleiðsluskipanin skal venda sær móti tí partinum av tí handilsliga grundarlagnum hjá fyritøkuni, sum viðvíkur tí løggildingarfevnda arbeiðinum. Elnevndin ella ein av Elnevndini góðkendur eftiransingarstovnur skal góðkenna og javnan eftirkanna góðskuleiðsluskipanina, sbr. tó stk. 5

Eftir stk. 2 í uppdskotinum ber fyritøkan kostnaðin, í sambandi við at góðskuleiðsluskipanin hjá fyritøkuni verður góðkend og eftirkannað.

Í stk. 3 verður skotið upp, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um innihaldið í góðskuleiðsluskipanini, undantak frá kravinum um eftirkanning av góðskuleiðsluskipanini fyri fyritøkur, sum ikki hava fastan vinnustað í Føroyum, og sum gera arbeiði sum fyribils tænastuveitingar í Føroyum, eykaeftirkanning av góðskuleiðsluskipanini í førum, har fyritøkan hevur verið órøkin í sambandi við útinning av innleggingararbeiði, og góðkenning av eftiransingarstovnum og eftirkanning av góðkendum eftiransingarstovnum, sum ikki hava fastan vinnustað í Føroyum.

Ein fyritøka, sum ikki hevur fastan vinnustað í Føroyum skal skjalprógva, at hon hevur eina góðskuleiðsluskipan, sum viðvíkur arbeiðum, sum fyritøkan ger í Føroyum, og sum kann verða góðkend eftir reglum ásettum eftir stk. 3, nr. 1, ella aðra skipan, sum kann javnmetast við eina slíka skipan, sbr. stk. 4 í uppskotinum.

Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um akkreditering av eftiransingarstovnunum, m.a. at tann einstaki eftiransingarstovnurin ber útreiðslurnar í sambandi við akkreditering og eftirkanning av sínum førleikum og síni góðskuleiðsluskipan. Eitt krav um akkreditering kemur í staðin fyri  eftirkanningina hjá Elnevndini av eftiransingarstovnunum, sbr. stk. 5 í uppskotinum

Eftir uppskotinum er tað ein møguleiki, at  Elnevndin ikki sjálv eftirkanna og góðkenna góðkuleiðsluskipanina. Í staðin kann tað verða ein óheftur triðipartur (t.e. privat feløg), sum skal eftirkanna og góðkenna skipanina, og hetta skal skjalprógvast mótvegis Elnevndini.

Akkreditering er ein ES-skipan, sum setur akkrediteringsstovnum og akkrediteraðum fyritøkum krøv. Í Danmark er DANAK sambært lóg tilnevnt nationalur akkrediteringsstovnur. Í Føroyum er Heilsufrøðiliga starvsstovan akkrediterað at hava eftirlit á sínum øki. Hetta hevur stóran týdning fyri útflutningin av fiskavørum.

Ein slík skipan í Føroyum hevur týdning í førum, har elinnleggingarfyritøkur hava í hyggju at gera elarbeiði í ES/EBS-londum. Skal ein akkrediteringsskipan hava týdning í tí

sambandinum, mugu vit fylgja ES-krøvum um akkreditering og nýta akkrediteringsstovnar sum t.d. DANAK og akkrediteraðar fyritøkur, sum fylgja ES-reglunum.

*Kapittul 6*

*Burturfall og afturtøka*

*Burturfall*

*Til § 14*

Í § 6, stk. 1, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at løggildingin fellur burtur, um handhavin doyr ella kropsliga ella rættarliga ikki verður førur fyri at útinna virksemið longur. Eftir umsókn frá deyðsbúnum, trotabúnum ella tí, sum annars virkar vegna tann løggilda, kann SEV tó loyva virkinum at halda fram bráðfeingis undir eftirliti og ábyrgd hjá øðrum løggildum elinnleggjara. Slíkt loyvi kann bara verða givið fyri eitt ár. Undir serligum umstøðum kann SEV tó leingja freistina upp í seks mánaðir.

Eftir uppskotinum fellur ein løggilding, sum er latin sambært §§ 4 og 5, burtur, tá ið fyritøkan kemur undir trotabúaviðgerð, fer í avtøku ella steðgar, ella eingin fakligur ábyrgdari longur er knýttur at fyritøkuni, sbr. § 4, stk. 1, nr. 1, ella tann fakligi ábyrgdarin ikki er til staðar í meira enn seks fylgjandi vikur.

*Til § 15*

Í § 6, stk. 1, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at løggildingin fellur burtur, um handhavin rættarliga ikki verður førur fyri at útinna virksemið longur.

Skotið verður upp, at ein góðkenning sum fakligur ábyrgdari fellur burtur, tá ið tann góðkendi ikki longur lýkur treytirnar í § 7, stk. 1, nr. 2, t.e. ikki longur er myndigur ella er komin undir verjumál sambært § 7 í verjumálslógini.

*Afturtøka*

*Til § 16*

Eftir § 9 í galdandi løggildingarlóg kann Elnevndin taka eina løggilding aftur, um ein løggildur elinnleggjari í sambandi við útinning av innleggingararbeiði hevur gjørt seg sekan í grefligum vansketni ella vansketni ferð eftir ferð ella hevur brotið treytirnar fyri løggildingini.  Eftir galdandi reglum kann avgerðin hjá Elnevndini um afturtøku ikki verða løgd fyri annan fyrisitingarligan myndugleika.

Tann løggildi kann eftir § 10 í galdandi lóg krevja, at avgerðin um at taka løggildingina aftur verður løgd fyri dómstólarnar. Ein áheitan hesum viðvíkjandi skal leggjast fyri Elnevndina, sum stevnir viðkomandi fyritøku samsvarandi mannagongdini í borgarligum rættargangi.

Eftir umsókn kann Elnevndin eftir § 11 í galdandi lóg altíð taka eina framda afturtøku av eini løggilding av. Er ein afturtøka framd fyri óásetta tíð, og eru í minsta lagi fimm ár liðin síðan afturtøkuna og minsta lagi tvey ár, síðan avtøka seinast varð noktað við dómi, kann ein

umsøkjari, sum fær noktandi svar upp á eina umsókn um avtøku, innan eina freist upp á fýra vikur krevja, at dómstólarnir royna avgerðina.

Skotið verður upp, at Elevndin í teimum í § 16, stk. 1, nr. 1-4, nevndu førunum skal kunna taka eina løggilding aftur.

Uppskotið um afturtøku av órøkjuskapi, av tí at fyritøkan ikki longur hevur fastan vinnustað í Føroyum, ella av tí at treytirnar fyri løggildingini ikki longur eru loknar, svarar til galdandi rættarstøðu.

Uppskotið um afturtøku, av tí eftiransingarstovurin ikki kann góðkenna góðskuleiðluskipanina endaliga, ella av tí at tað leypandi eftirlitið við góðskuleiðluskipanini ella eykaeftirkanningin sambært §14, stk. 3, nr. 3, avdúkar grefligar feilir við innaneftirlitinum, er nýtt í mun til galdandi lóg.

Avleiðingin av eini afturtøku er, at løggildingin ikki hevur gildi longur. Tað merkir, at fyritøkan má søkja um løggilding av nýggjum, um hon seinni aftur lýkur treytirnar fyri at fáa løggilding.

*Kapittul*

*Boð*

*Til § 17*

Ásetingin í § 17 er nýggj.

Bakstøðið fyri ásetingini er, at økið, har fyritøkur, sum ikki hava løggilding, kunnu gera innleggingararbeiði, eftir uppskotinum verður víðkað samanborið við galdandi reglur um fyritøkur, sum kunnu gera løggildingarfevnd arbeiðir uttan at hava ein persónliga løggildan í starvi í fyritøkuni. Víst verður til viðmerkingarnar til § 2, stk. 2-4, og § 3, stk. 1, nr. 1 og 2, í uppskotinum.

Fremja hesar fyritøkurnar munandi brot á tær teknisku ásetingarnar í eltrygdarlógini ella reglum ásettum sambært eltrygdarlógini, eigur tað at vera møguligt at taka rættin at gera slík arbeiðir frá teimum. Hetta svarar til møguleikan eftir galdandi reglum at taka løggildingina frá einum, sum hevur persónliga løggilding.

Sostatt verður skotið upp í stk. 1, at hevur ein fyritøka, sum ger elektrisk arbeiðir sambært § 2, stk. 3 og 4, ella sambært reglum ásettum sambært § 3, stk. 1, nr. 1 og 2, ella stk. 2, grefliga ella ofta framt brot á krøv í reglum sambært áður galdandi løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað, krøv í reglum sambært galdandi eltrygdarlóg ella onnur trygdarkrøv, kann Elnevndin geva fyritøkuni boð um at lata eina løggilda fyritøku gera slík arbeiðir.

Í stk. 2 verður skotið upp at áseta, at ein fyritøka, sum hevur fingið boð eftir stk. 1, skal kunna heita á Elnevndina um at meta um, um boðiini framvegis skulu standa við, um fyritreytirnar fyri boðunum eru broyttar. Ásetingin kann verða nýtt, um tað vísir seg, at upplýsingar eru, sum Elnevndin ikki hevði, tá ið boðini vórðu givin. Ásetingin kann eisini verða nýtt, um viðurskiftini, sum høvdu týdning fyri, at boðini vórðu givin, seinni broytast. Støðan kann t.d.

vera, at fyritøkan hevur sett eitt nýtt starvsfólk við serligum førleikum, ella at fyritøkan kann skjalprógva eina menning viðvíkjandi førleikunum hjá starvsfólkunum.

Í stk. 3 verður skotið upp, at ein fyritøka sum hevur fingið boð eftir stk. 1, skal kunna krevja, at avgerðin verður løgd fyri dómstólarnar. Ein áheitan um at leggja málið fyri dómstólarnar skal leggjast fyri Elenvndina, í seinasta lagi fýra vikur eftir at avgerðin er fráboðað fyritøkuni. Eftir stk. 4 í uppskotinum skal Elnevndin uttan óneyðugan steðg stevna fyritøkuni. Ein áheitan um at reisa sakarmál eftir stk. 3 hevur eftir stk. 5 í uppskotinum steðgandi virknað. Rætturin kann tó við úrskurði gera av, at sakarmálið ikki skal hava steðgandi virknað.

*Kapittul 8*

*Lýsingar o.a.*

*Til § 18*

Í § 13 í galdandi løggildingarlóg er ásett, at hava persónar ella fyritøkur onga løggilding sum elinnleggjarar, ella er løggildingin burturfallin ella afturtikin, skulu hesi ikki við lýsing ella á annan hátt geva eina fatan av, at tey hava løggilding.

Tað verður mett at vera hóskandi, at hesar reglurnar halda fram í §18 í uppskotinum, soleiðis at er greitt ásett, at fyritøkur við ongari løggilding ikki skulu gera nakað, sum kann geva brúkarum ta fatan, at fyritøkan hevur rætt at gera løggildingarfevnt arbeiði.

Hevur ein fyritøka onga góðkenning eftir § 4 ella § 5, ella er løggildingin burturfallin ella afturtikin, skal hon ikki við lýsingum ella á annan hátt gera nakað, sum kann geva eina fatan av, at fyritøkan hevur løggilding.

Tað veldst um eina ítøkiliga meting, nær viðurskiftini kunnu sigast at geva eina fatan av, at fyritøkan hevur løggilding. T.d. kann nýtsla av heitinum *elinnleggingarfyritøka* og lýsingar við hesum heitinum eftir umstøðunum vera brot á reglurnar.

Kann ein lýsing ella eitt annað átak geva eina fatan av, at fyritøkan hevur løggilding, er talan um brot á reglurnar. Lýsingini ella átakinum nýtist sostatt ikki ítøkiliga at hava volt eina slíka fatan. Tað hevur ongan týdning, um fyritøkan eisini hevur gjørt løggildingarfevnd arbeiði.

*Kapittul 9*

*Eftirlit*

*Til § 19*

Sambært § 3 í kunngerð um løggilding av elinnleggjarum skal SEV hava fráboðan um allar broytingar í arbeiðs- og ábyrgdarviðurskiftunum hjá einum settum løggildum elinnleggjara, og tann løggildi skal eftir áheitan frá SEV geva SEV allar upplýsingar um arbeiðs- og ábyrgdarviðurskiftini í fyritøkuni.

Skotin verður upp ein nýggj, generell áseting um eftirlit, sum ásetur, at Elnevndin hevur eftirlit við, at ásetingarnar í hesi løgtingslógini og reglur ásettar sambært hesi løgtingslógini verða hildnar.

Við ásetingini verður heimildin hjá Elnevndini at hava eftirlit *ex officio* nágreinað. Ætlanin er sostatt ikki at gera nakra broyting viðvíkjandi eftirlitinum hjá Elnevndini.

Sambært § 3 í kunngerð um løggilding av elinnleggjarum skal SEV hava fráboðan um allar broytingar í arbeiðs- og ábyrgdarviðurskiftunum hjá einum settum løggildum elinnleggjara, og tann løggildi skal eftir áheitan frá SEV geva SEV allar upplýsingar um arbeiðs- og ábyrgdarviðurskiftini í fyritøkuni.

Í stk. 2 verður skotið upp, at eftirlitsmyndugleikin framvegis altíð skal kunna krevja at fáa allar upplýsingar, sum honum tørvar til at meta um, um treytirnar fyri eini løggilding framvegis eru loknar.

Eftir uppkotinum er tað Elnevndin, sum kann krevja at fáa upplsýingarnar, í staðin fyri SEV, sum tað er eftir galdandi lóg.

Ásetingin verður avmarkað av tí vanliga forboðnum fyri sjálvinkriminering, sum m.a. skilst á grein 6 í Evropeiska mannarættindasáttmálanum. Er ítøkliga illgruni um, at upplýsingarnar fara at vísa, at okkur revsivert er farið fram, bera sostatt ikki til at krevja at fáa upplýsingarnar. Í slíkum førum eigur málið at verða latið løgregluni til eftirkanningar.

*Til § 20*

Eftir § 14 í galdandi løggildingarlóg hava umboð fyri Elnevndina, um tað verður mett at vera neyðugt, eftir boðum frammanundan við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð atgongd at almanna- og einstaklingsogn til tess at kanna ella lata kanna, um ein elinnleggjari hevur útint eitt innleggingararbeiði á nóg góðan hátt.

Eftir § 14, stk. 2, í galdandi lóg veitir løgreglan hjálp í hesum sambandi eftir reglum, sum verða ásettar eftir samráðing millum landsstýrið og landfútan.

Í stk. 1 verður skotið upp, at er illgruni um váða fyri vandamiklum elektriskum innleggingum, skal Elnevndin við samleikaváttan og uttan rættarskurð hava atgongd at almennum og privatum ognum og plássum. Verður mett, at tað krevst til at fremja munadygt eftirlit við fyritøkum, sum eru fevndar av løgtingslógini, skal Elnevndin somuleiðis við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð hava at atgongd at ognum og plássum, haðan fyritøkan verður rikin. Verður mett, at tað krevst til at fremja munadygt eftirlit við fyritøkum, sum eru fevndar av hesi løgtingslógini, hevur Elnevndin harumframt við samtykki frá borgara ella fyritøku, sum verða ávirkað, atgongd at øðrum almennum og privatum ognum og plássum.

Ásetingin í stk. 1 um atgongdina hjá Elnevndini at almennum og privatum ognum uttan rættarúrskurð svarar til § 14, stk. 1, í galdandi lóg. Eftir uppskotinum verður økið, sum atgongdin fevnir um, tó víðkað til eisini at fevna um góðskuleiðsluskipanina og um, at ein fakligur ábyrgdari er knýttur at fyritøkuni. Gjørd verður eisini ein minni víðkan við atliti at, hvussu víðtøkin ásetingin er samanborin við galdandi ásetingar um atgongd uttan rættarúrskurð.

Ásetingin í 1. pkt. hevur við sær, at er illgruni um váða fyri vandamiklum elektriskum innleggingum, hevur Elnevndin atgongd at almennum og privatum ognum. Bakstøðið fyri ásetingini er tørvurin á at kunna fáa atgongd at plássum, har illgruni er um vandamiklar

innleggingingar. Talan kann vera um førir, har Elnevndin ikki fær atgongd at eini ogn við avtalu við eigaran og tí má nýta ásetingina fyri at eftirkanna og rætta ta vandamiklu innleggingina.

Ásetingin í 2. pkt. hevur við sær, at Elnevndin, um mett verður, at tað krevst til at fremja munadygt eftirlit við fyritøkum, sum eru fevndar av løgtingslógini, við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð fær atgongd at ognum og plássum, haðan fyritøkan verður rikin.

Tørvur kann vera á, at Elnevndin fær atgongd at ognum og plássum, haðan fyritøkur verða riknar, t.d. í førum, har eftiransingarstovnurin í sambandi við eftirkanning av góðskuleiðsluskipanini hjá fyritøkuni hevur staðfest frávik. Í slíkum førum kann Elnevndin hava tørv á at fremja eftirlit hjá fyritøkuni m.a. fyri at kanna, um arbeiðir, sum fyritøkan hevur gjørt, eru í lagi. Elnevndin kann somuleiðis hava tørv á atgongd at fyritøkuni, um Elnevndin hevur fingið upplýsingar, sum benda á, at fyritøkan ikki longur lýkur treytirnar fyri løggildingini. Talan kann vera um upplýsingar, sum vekja illgruna um, at eingin fakligur ábyrgdari longu er knýttur at fyritøkuni. Ber ikki til hjá Elnevndini at fáa slíka upplýsingar sannaðar ella avsannaðar, av tí at fyritøkan noktar at lata upplýsingarnar frá sær, kann Elnevndin verða noydd at fara á eftirlitsvitjan hjá fyritøkuni.

Nær tørvur kann sigast at vera á at fáa atgongd at einum plássi hjá eini fyritøku, veldst m.a. um, um til ber hjá Elnevndini at fáa hendur á nøktandi upplýsingar á annan hátt. Kann fyritøkan t.d. senda Elnevndini upplýsingar um mannagongdir, førleikar, gjørdar innleggingar o.a., verða hesar upplýsingarnar tiknar við í metingina, tá ið mett verður, um tørvur kann sigast at vera á atgongdini til at tryggja so munadygt eftirlit sum gjørligt.

Ásetingin í 3. pkt. hevur við sær, at Elnevndin harumframt, um mett verður, at tað krevst til at fremja munadygt eftirlit við fyritøkum, sum eru fevndar av løgtingslógini, við samtykki frá borgara ella fyritøku, sum verða ávirkað, hevur atgongd at øðrum almennum og privatum ognum og plássum.

Bakstøðið fyri hesum er tørvurin á at kunna hava munadygt eftirlit við løggildum fyritøkum. Í førum, har Elnevndin hevur vitan um, at ein løggild fyritøka hevur gjørt feilir ella verið óansin í sambandi við gerð ella servisering av eini innlegging, kann grundarlag vera fyri at seta í verk eftirlit við fyritøkuni og arbeiðinum hjá fyritøkunni fyri at kanna, um talan er um ein einstakan feil ella generellar trupulleikar við gjørdum innleggingum ella serviseringum. Hetta fyri at forða fyri, at óansnið endurtekur seg og elvir til váða fyri vandamiklum innleggingum.

Í slíkum førum má Elnevndin hava atgongd at t.d. privatum heim, har fyritøkan hevur gjørt innleggingar. Fyri at fáa slíka atgongd skal Elnevndin hava samtykki frá partinum, sum atgongdin viðvíkur. Fæst ikki samtykki frá viðkomandi parti, má Elnevndin kanna innleggingarnar hjá onkrum øðrum kunda hjá fyritøkuni.

Tað velst um eina ítøkliga meting, nær tørvur kann sigast at vera á at fáa atgongd at almennum ella privatum plássum, ella um gjørdar innleggingar kunnu kannast á annan hátt, t.d. við borgarin sendur upplýsingar møguliga sum fotomyndir.

Eftir § 14 í uppskotinum til eltrygdarlóg, sum verður lagt fyri tingið saman við hesum uppskotinum, hevur Elnevndin ella eitt felag, sum er heimilað sambært § 23 í tí uppskotinum, nær sum sum helst við samleikaprógvi og uttan rættarúrskurð atgongd at almennum og

privatum ognum og støðum fyri at útvega upplýsingar, sum skulu brúkast til eftirlit við eltrygdarlógini. Ásetingin kann verða nýtt í sambandi við eftirlitsvitjanir hjá eigarum ella brúkarum av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum umframt hjá teimum, sum framleiða elektriskt tilfar, og teirra umboðsfólkum og í sambandi við eftirlitsvitjanir í bakhølum í handlum.

Verður eftir eini heildarmeting mett, at tøvur er á at fáa atgongd at einum plássi, undir hesum einum høli hjá fyritøkuni og onnur hølir, har fyritøkan hevur gjørt innleggingar ella servisering, t.d. í privatum heimum, kann Elnevndin nýta ásetingina. Verður tørvur ikki mettur at vera á tí, kann Elnevndin hinvegin ikki nýta ásetingina og má fremja eftirlit á annan hátt, t.d. við at fáa upplýsingar frá fyritøkuni ella borgaranum.

Eftiransingarstovnar, sum Elnevndin sambært § 13 í uppskotinum hevur góðkent til at góðkenna og framhaldandi eftirkanna góðskuleiðsluskipanir hjá fyritøkum og gera eftirkanning sum óheftir triðjupartar, koma sostatt ikki út í fyritøkurnar sum umboð fyri ein myndugleika, men við støði í eini avtalu millum fyritøkuna og eftiransingarstovnin. Tað merkir, at sleppir fyritøkan ikki eftiransingarstovninum inn í fyritøkuna at gera eftirkanningina, kann avleiðingin verða, at góððskuleiðsluskipanin hjá fyritøkuni ikki kann verða góðkend. Tað kann hava við sær, at Elnevndin tekur avgerð um at taka løggildingina aftur.

Í stk. 2 verður skotið upp, at Elevndin skal kunna heita á løgregluna um at vera sær til hjálpar, tá ið heimildirnar eftir stk. 1 verða útintar.

*Til § 21*

Í § 8 í galdandi løggildingarlóg er ásett, at SEV skal ansa eftir, at arbeiðið, sum løggildingarkravið og fráboðanarskylda fevna um, er útint av persónum ella virkjum, sum sambært reglunum í hesi løgtingslógini hava heimild til tað. Staðfestir SEV, at reglurnar í hesi løgtingslógini eru brotnar, ella at ein løggildur elinnleggjari hevur gjørt seg sekan í øðrum viðurskiftum, sum kunnu hava við sær, at løggildingin verður tikin aftur, sbr. § 9, boðar SEV Elnevndini frá hesum.

Við uppskotinum verður nágreinað, at talan er um fráboðanir sambært uppskotinum til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (eltrygdarlógini) ella sambært reglum ásettum sambært tí løgtingslógini.

Sostatt verður skotið upp, at netfyrtitøkan í sambandi við fráboðanir, sum eru kravdar sambært eltrygdarlógini ella reglum ásettum sambært eltrygdarlógini, skal kanna eftir, um arbeiðið er gjørt av fyritøkum, sum sambært reglunum í uppskotinum til løggildingarlóg ella reglum ásettum sambært hesi løgtingslógini hava heimild at gera tað.

Reglur um fráboðanir eru í dag ásettar í kunngerð nr. 172 frá 21. september 1993 um elinnleggingarvirksemi. Sambært kunngerðini skal m.a. boðast frá nýggjum innleggingum og broytingum í innleggingum, og elinnleggjarin skal í sambandi við hvørt arbeiði fylgja arbeiðsgongdini hjá SEV viðvíkjandi tí at senda inn oyðubløð, tekningar o.a. og annars fylgja skipanum og ávísingum hjá SEV viðvíkjandi útinning av ávísum arbeiðum.

*Til § 22*

Í § 8, stk. 2, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at staðfestir SEV, at reglurnar í løgtingslógini eru brotnar, ella at ein løggildur elinnleggjari hevur gjørt seg sekan í øðrum viðurskiftum, sum kunnu hava við sær, at løggildingin verður tikin aftur, skal SEV boða Elnevndini frá hesum.

Skotið verður upp, at fráboðanarskyldan hjá SEV heldur fram, men at *SEV* verður broytt til *ein netfyritøka*.

Sostatt verður skotið upp, at ein netfyritøka skal boða Elenevndini frá, um staðfest verður, at brot er framt á reglur í hesi løgingslógini ella reglur ásettar sambært hesi løgtingslógini, at órøkjuskapur er framdur í sambandi við útinning av arbeiðinum, ella at tann løggilda fyritøkan hevur virkað á ein hátt, sum kann hava við sær, at løggildingin verður tikin aftur sambært § 15, stk. 1.

Við hesum verður tryggjað, at Elnevndin verður kunnað, um netfyritøkan í sambandi við eftirlitsskyldurnar eftir § 21 í uppskotinum ella á annan hátt fær kunnleika um, at fyritøkur, sum ikki hava heimild til tað, hava gjørt løggildingarfevnt arbeiði, ella at ein løggild fyritøka hevur virkað á ein hátt, sum kann hava við sær, at løggildingin verður tikin aftur.

*Kapittul 10*

*Fyrisiting*

*Til § 23*

Sambært § 3 í galdandi løggildingarlóg kann landsstýrismaðurin í samráð við Elnevndina áseta reglur um mannagongdina í sambandi við umsókn um løggilding.

Hesar ásetingarnar halda eftir § 23 í uppskotinum fram fyri fyritøkur og fakligar ábyrgdarar.

Ætlanin er, at heimildin verður sett í verk í eini kunngerð, sum ásetur reglur um mannagongdina í samband við umsókn um fyritøkuløggilding, umsókn um góðkenning sum fakligur ábyrgdari og aðrar umsóknir sambært hesi løgtingslógini, t.d. um undantak eftir § 10.

*Til § 24*

Eftir uppskotinum kann landssýrismaðurin áseta reglur um, at fyriskipanir, sum settar verða í gildi sambært løgtingslógini, sum seta fyritøkum o.ø. krøv, og tekniskar spesifikatiónir, sum víst verður til í slíkum fyriskipanum, ikki verða førdar inn í Kunngerðablaðið.

Ásetingin er bara galdandi fyri tekniskar spesifikatónir, sum næstan bara venda sær til ein smalan skara av professionellum, sum nýta fyriskipanirnar vinnuliga.

Talan kann t.d. vera um standardin DS/EN ISO/IEC 17021 "*Overensstemmelsesvurdering - Krav til organer, der foretager audit og certificering af ledelsessystemer*". Eftir § 13 í uppskotinum kann krav verða sett um, at eftiransingastovnar skulu nýta henda standardin. Av tí at tað upphavsrættarliga er DANAK (Den Danske Akkrediteringsfond), sum eigur standardin, kann hann ikki almannakunngerast í Kunngerðablaðnum.

Eftir stk. 2 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um, hvussu upplýsingar kunnu fáast um innihaldið í fyriskipanunum og teimum teknisku spesifikatiónunum, sum eru nevndar í stk. 1

Eftir stk. 3 í uppskotinum kann landsstýrismaðurin áseta reglur um, at tekniskar spesifikatiónir, sum ikki verða tiknar upp í Kunngerðablaðið, sbr. stk 1, skulu vera galdandi, hóast tær ikki eru á føroyskum máli.

*Kapittul 11*

*Kæra*

*Til § 25*

Eftir galdandi løggildingarlóg kunnu avgerðir, sum Elnevndin hevur tikið eftir lógini, við støði í vanligum yvir-/undirskipanarviðurskiftum kærast til landsstýrismannin, um ikki kæruatgongdin er avkvett í lóg. Galdandi løggildingarlóg hevur onga slíka áseting, sum generelt kvettir kæruatgongdina til landsstýrimannin av.

Skotið verður upp at strika kæruatgongdina til landsstýrismannin.

Sakkunnleikin, sum krevst til at viðgera slíkar kærur, finst ikki í stjórnarráðnum, og tí verður skotið upp at strika kæruatgongdina til landsstýrismannin.

Í § 5, stk. 1, nr. 1 og 2, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at ein umsókn um løggilding kann fáa noktandi svar,

> *1) um umsøkjarin er frádømdur rættinum til at útinna løggilt virksemi, sbr. § 78, 2. stk. í revsilógini, ella*
> *2) um umsøkjarin í starvi ella vinnu annars hevur víst slíkan atburð, at grund er til at halda, at hann ikki fer at reka virkið á fullgóðan hátt.*

Í § 5 stk. 2, í galdandi løggildingarlóg er ásett, at *verður umsóknin um løggilding sýtt grundað á tey viðurskifti, sum nevnd eru í 1. stk. nr. 2, kann umsøkjarin innan 4 vikur, aftaná at sýtingin er fráboðað honum, skjóta málið inn fyri landsstýrið.*

Eftir stk. 2 eru tað bara avgerðir um noktan, sum eru grundaðar á viðurskiftini, sum eru nevnd í stk. 1, nr. 2, sum kunnu leggjast fyri landsstýrismannin.

Ásetingin heldur eftir uppskotinum fram, tó soleiðis, at noktandi svar upp á eina umsókn um løggilding og góðkenning sum fakligur ábyrgdari, sum er grundað á umstøður, sum eru nevndar í § 9, stk. 1, nr. 2, t.e., at umsøkjarin í starvi ella vinnu annars hevur sýnt slíkan atburð, at orsøk er at halda, at fyritøkan ikki fer at verða rikin á fullgóðan hátt, kann leggjast fyri Vinnukærunevndina, í seinasta lagi fýra vikur eftir at boðað er frá svarinum.

Bakstøðið fyri ynskinum um sakkøna roynd av noktandi svarum er, at Elnevndin í sambandi við noktandi upp á umsóknir um løggilding ella góðkenning sum fakligur ábyrgdari, sum eru grundað á, at umsøkjarin í starvi ella vinnu annars hevur sýnt slíkan atburð, at orsøk er at halda, at fyritøkan ikki fer at verða rikin á fullgóðan hátt, tekur avgerðir, sum eru bygdar á eina óbundna meting.

*Kapittul 12*

*Revisásetingar*

*Til § 26*

Ásetingin er framhald av § 15, stk. 1, í galdandi løggildingarlóg.

Skotið verður upp, at revsingin fyri brot á tær nevndu ásetingarnar verður bót.

Skotið verður upp, at tann, sum uttan at vera heimilaður til tað ger arbeiði, sum krevur løggilding, verður revsaður við bót.

Hóas tað sum stakmál kann vera talan um eitt formligt brot á lógina, um persónar og fyritøkur, sum ikki eru heimilað til tað, gera løggildingarfevnt arbeiði, kann tað elva til ein trygdarváða, sum eigur at síggjast aftur í støddini á bótini.

Nr. 2 í uppskotinum er framhald av § 15, stk. 1, nr. 2 í galdandi løggildingarlóg. Tó verður tað mett at vera hóskandi at nágreina, at tað bara er tann, sum tilætlað ella av grovum ósketni letur eina fyritøku ella ein persón, sum ikki eftir hesi løgtingslógini hevur heimild til tað, gera arbeiði, sum krevur løggilding.

Í nr. 3 verður skotið upp, at brot á ásetingarnar um tilknýtið hjá tí fakliga ábyrgdaranum til fyritøkuna verða revsað við bót.

Skotið verður upp, at tað í reglum ásettum sambært §§ 3, 6 og 9 kann verða ásett, at brot á reglurnar verða revsað við bót.

Í stk. 3 verður skotið upp, at tá ið revsing verður ásett, skal dentur serliga leggjast á, um brotið hevur elvt til váða fyri trygdina, og um brotið er framt sum liður í einum skipaðum broti á reglurnar.

Ætlanin við ásetingini er at herða bótarrevsingina undir teimum nevndu umstøðunum fyri at tryggja, at bøturnar fáa fyribyrgjandi virknað.

Revsingarásetingin fer framvegis at valdast ta ítøkiligu metingina hjá dómstólunum av øllum umstøðunum í málinum, og vikið kann verða frá tí nevnda revsingarstiginum, uppeftir ella niðureftir, um tað í ítøkiligum førum eru herðandi ella linnandi umstøður, sbr. tær vanligu reglurnar um revsingaráseting í kapitli 10 í revsilógini.

*Til § 27*

Ásetingin er framhald av § 15, stk. 3, í galdandi løggildingarlóg.

*Kapittul 13*

*Gildiskoma og skiftisásetingar*

*Gildiskoma*

*Til § 28*

Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. januar 2021.

Í stk. 2 verður skotið upp, at galdandi løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum v. m. fer úr gildi.

*Skiftisásetingar*

*Til § 29*

Skotið verður upp, at persónligar løggildingar, sum eru givnar, áðrenn henda løgtingslógin kemur í gildi, verða verandi í gildi, til tær møguliga vera skiftar um við eina góðkenning sum fakligur ábyrgdari ella falla burtur.

Elnevndin tillagar tær persónligu løggildingarnar eftir galdandi løggildingarlóg, so at hesir persónarnir verða skrásettir sum fakligir ábyrgdarar.

Tá ið hesir persónarnir fingu sína løggilding, luku teir krøvini, sum tá vóru galdandi, m.a. um at hava staðið eina roynd, um at vera persónliga myndigir og um ikki innan fyri tey seinastu trý árini at vera revsaðir fyri brot á viðkomandi lóggávu.

Tí verða eingi skjalprógv kravd fyri, at krøvini í § 7 í uppskotinum eru lokin, tá ið henda góðkenningin fær støðu sum varandi góðkenning sum fakligur ábyrgdari.

Í stk. 2 verður skotið upp, at § 15 í uppskotinum verður nýtt samsvarandi í sambandi við tær í stk. 1 nevndu løggildingarnar.

Tað merkir, at løggildingar, sum eru givnar eftir áður galdandi reglum, falla burtur eftir reglunum í uppskotinum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 6. Janunar 2020

**Helgi Abrahamsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen